# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 27. juni 2018
Mál nr.: 17/00276
Málsviðgjørt: jd

**Løgtingsmál nr. xx/2018: Uppskot til løgtingslóg um matstovu- og gistingarhúsvirksemi (Matstovulógin)**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**matstovu- og gistingarhúsvirksemi**
**(Matstovulógin)**

*Økið lógarinnar og allýsingar*

**§ 1.** Henda lóg er galdandi fyri matstovu- og gistingarhúsvirksemi og fyri ølsølur, sbr. stk. 3.

*Stk. 2.* Fyri áhugafeløg og onnur feløg er lógin galdandi í tann mun, felagið ber brá av at vera vinnurekandi, ella har felagið móti gjaldi borðreiðir við mati og rúsdrekka fyri almenninginum.

*Stk. 3.* Í hesi lóg merkir:

1) *Gistingarhúsvirksemi:* Móttøka av gistandi við møguleika fyri borðreiðing.

*2) Matstovuvirksemi:* Borðreiðing av mati og drykkjuvørum.

3) *Kafévirksemi:* Borðreiðing av einføldum mati og drykkjuvørum.

4) *Diskoteksvirksemi:* Høli, sum annaðhvørt hevur eitt fast dansigólv ella har skipað verður fyri dansi.

5) *Vertshúsvirksemi:* Høli, har tað bara, ella mestsum bara, verður skonkt rúsdrekka.

6) *Mentanarligt virksemi*: Søvn, biografar, sjónleikarhús o.tíl.

7) *Hissiniskeinking:* Skeinking til einstøk, ikki afturvendandi, tiltøk, sum eru á støðum, ið ikki hava skeinkiloyvi.

8) *Rúsdrekka:* Allur løgur, sum í sær hevur í minsta lagi 2,8 rúmprosent av alkoholi. Heilivágur, uttan mun til alkoholinnihald, sum bara apotekið kann selja eftir apotekaralóggávuni, er ikki fevndur av hesi lóg.

9) *Borðreiðing:* At selja mat og drykkjuvørur, ið skulu nýtast á sølustaðnum ella við sølustaðið.

*10) Ølsøla:* Bryggjarí, sum á egnum sølustøðum selja egna framleiðslu við í mesta lagi 5,8 rúmprosentum av alkoholi.

*Almennar treytir fyri matstovur, skeinkingarstøð og gistingarhús*

**§ 2.** Høli, sum skulu brúkast til matstovu ella skeinkingarstað, sbr. § 1, stk. 3, nr. 1-3, skulu løggildast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni eftir løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010 um matvørur og reglum, givnar við heimild í matvørulógini. Høli, sum skulu brúkast til skeinkingarstað ella

har skonkt verður, sbr. § 1, stk. 3, nr. 4-6, skulu skrásetast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni eftir løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010 um matvørur og reglum, givnar við heimild í matvørulógini.
*Stk. 2.* Høli, sum verða brúkt til virksemi, nevnt í § 1, stk. 3, nr. 1-6, skulu harumframt góðkennast av brunamyndugleikunum eftir løgtingslóg nr. 20 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar (byggilógin) og reglum, givnar við heimild í byggilógini.
*Stk. 3.* Loyvisnevndin samskipar umsóknir um og útskrivar endaligt loyvi til virksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 1-6.
*Stk. 4.* Áðrenn Loyvisnevndin letur endaligt matstovu- og skeinkiloyvi, skal ummæli fáast frá politinum og avvarðandi kommunu.
*Stk. 5.* Loyvi eftir stk. 3 hava gildi í 4 ár frá dagfestingini á loyvinum at rokna, sbr. tó § 9, stk. 1, 2. pkt. Søkjast skal um endurnýggjan í seinasta lagi 3 mánaðir fyri, at loyvið fer úr gildi.
*Stk. 6.* Loyvi eftir stk. 3 skulu altíð endurnýggjast eftir reglunum í stk. 1-4, tá munandi umbyggingar eru gjørdar, tá hølini hava verið brúkt til annað endamál enn tað, sum loyvið varð givið til, og tá virksemið verður yvirtikið og rikið av øðrum enn upprunaliga loyvishavaranum.
*Stk. 7.* Umsøkjarin hevur ábyrgd av at søkja um góðkenningar og loyvi, sum møguliga eru kravd eftir aðrari lóggávu.
*Stk. 8.* Loyvt er ikki at fara undir virksemi, fevnt av hesi lóg, fyrr enn øll viðkomandi loyvi eru fingin.

*Almennar treytir fyri skeinkistøð og útskeinking av rúsdrekka*

**§ 3.** Tað er bert loyvt at skeinkja rúsdrekka á støðum við skeinkiloyvi. Virksemið á staðnum skal vera fevnt av í minsta lagi einari áseting í § 1, stk. 3, nr. 1-6.
*Stk. 2.* Privat tiltøk, har almenningurin ikki hevur atgongd, kunnu haldast á støðum, nevnd í stk. 1. Upp- og afturlatingartíðir, ásettar í § 16, eru galdandi á sama hátt fyri hesi tiltøk. Er tiltakið ætlað ungum undir 18 ára aldur, er ikki loyvt at selja ella bjóða rúsdrekka, sbr. § 4, stk. 1.

**§ 4.** Tað er bannað at selja ella lata rúsdrekka til persónar, yngri enn 18 ár, ella at selja ella lata rúdrekka, um tað er sannlíkt, at rúsdrekka er ætlað persónum, yngri enn 18 ár.
*Stk. 2.* Somuleiðis er bannað at selja ella lata persónum rúsdrekka, um hildið verður, at tey, við at drekka meira, kunnu vera sær sjálvum ella øðrum til vanda ella øðrum til ampa.
*Stk. 3.* Tann, sum selur, letur, skeinkir ella letur skeinkja rúsdrekka, hevur skyldu til at tryggja sær, um neyðugt við at síggja samleikaprógv, at móttakarin lýkur aldurstreytina í stk. 1.
*Stk. 4.* Á støðum við skeinkiloyvi hevur loyvishavarin skyldu til at gera vart við, at tað er bannað at skeinkja rúsdrekka fyri persónum, sum ikki hava fylt 18 ár. Hetta skal gerast við uppslagi á sjónligum staði.
*Stk. 5.* Á støðum við skeinkiloyvi hevur loyvishavarin skyldu til at gera vart við, at tað ikki er loyvt gestunum at drekka rúsdrekka, sum teir hava havt við sær. Hetta skal gerast við uppslagi á sjónligum staði
*Stk. 6.* Á støðum við skeinkiloyvi hevur loyvishavarin skyldu til tryggja, at tað eisini ber til at fáa aðrar drekkivørur enn rúsdrekka. Á príslista, vínkorti ella øðrum sjónligum uppslagi skal lættliga síggjast, at tílíkar drekkivørur eru at fáa.

**§ 5.** Á støðum við skeinkiloyvi mugu fólk undir 18 ár ikki setast at skeinkja rúsdrekka. Undantiknir frá hesum eru kokka- og tænaralærlingar við góðkendum lærusáttmála, ella persónar, ið hava lokið alla lærutíðina í tænarafakinum.

*Hissiniloyvi*

**§ 6.** Til støk tiltøk, har almenningurin hevur atgongd, t.d. samkomur, ráðstevnur, konsertir, festivalar og stevnur, kann Loyvisnevndin uttan mun til ásetingina í § 3 loyva, at rúsdrekka verður skonkt, um loyvishavari eftir § 11 ella § 12 stendur

fyri skeinkingini. Hissiniloyvi er ikki treytað av, at tað samstundis verður borðreitt við mati.
*Stk. 2.* Um skeinkingin er avmarkað til øl ella cider við í mesta lagi 5,8 rúmprosentum av alkoholi og til borðvín við í mesta lagi 15 rúmprosentum av alkoholi, kann Loyvisnevndin loyva persóni, sum ikki hevur skeinkiloyvi, men sum hevur fylt 25 ár, at standa fyri skeinkingini.
*Stk. 3.* Loyvisnevndin kunnar politiið um tiltøk eftir stk. 1-2.
*Stk. 4.* Tann, sum stendur fyri skeinkingini, skal í øllum lutum halda tær reglur, sum eru galdandi fyri skeinkingarvirksemi.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um hissiniloyvi, undir hesum eisini reglur um gjald fyri hissiniloyvi eftir stk. 1-2.

*Ølsøla*

**§ 7.** Loyvisnevndin kann heimila føroysku bryggjaríunum og bryggjaríum, sum eru fevnd av Hoyvíkssáttmálanum, á egnum sølustaði at selja ella lata egna framleiðslu teirra av øli, sum í sær hevur í mesta lagi 5,8 rúmsprosent av alkoholi.
*Stk. 2.* Loyvisnevndin kann taka loyvið eftir stk. 1 aftur eftir ásetingunum í § 14, um bryggjaríið hevur brotið treytirnar fyri loyvinum. Afturtøkan kann verða avmarkað til ávís sølustøð.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri treytir fyri loyvi til ølsølu.

*Loyvisnevndin*

**§ 8.** Loyvisnevndin hevur 5 limir, sum landsstýrismaðurin tilnevnir. Í Loyvisnevndini skulu vera ein løgfrøðingur, sum er formaður, eitt umboð fyri politiið, eitt umboð fyri heilsumyndugleikarnar, ein grannskoðari og ein persónur við hollum kunnleika til matstovu- og gistingarhúsvinnuna, ið kortini ikki sjálvur skal vera vinnurekandi í hesi vinnugrein. Fyri hvønn av limunum verður tilnevndur ein tiltakslimur. Nevndarskeiðið er 4 ár hvørja ferð.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um virksemi Loyvisnevndarinnar.

**§ 9.** Loyvisnevndin kann eftir umsókn veita matstovuloyvi. Eitt matstovuloyvi er galdandi í 4 ár, men Loyvisnevndin kann eftir umstøðunum avmarka og treyta matstovuloyvi.
*Stk. 2.* Matstovuloyvi er treytað av, at neyðug loyvi eftir § 2 eru fingin til vega.
*Stk. 3.* Søkjast skal um endurnýggjan av matstovuloyvinum í seinasta lagi 3 mánaðir fyri, at loyvið fer úr gildi. Virksemið kann halda fram sum vant, meðan umsókn um endurnýggjan verður viðgjørd.

**§ 10.** Loyvisnevndin kann eftir umsókn veita skeinkiloyvi. Eitt skeinkiloyvi er galdandi í 4 ár, men Loyvisnevndin kann eftir umstøðunum avmarka og treyta skeinkiloyvi.
*Stk. 2.* Skeinkiloyvi er treytað av, at neyðug loyvi eftir § 2 eru fingin til vega.
*Stk. 3.* Søkjast skal um endurnýggjan av skeinkiloyvinum í seinasta lagi 3 mánaðir fyri, at loyvið fer úr gildi. Virksemið kann halda fram sum vant, meðan umsókn um endurnýggjan verður viðgjørd.

*Skeinkiloyvi til persónar*

**§ 11.** Skeinkiloyvi kann veitast persóni, sum
1) hevur fylt 25 ár ella hevur staðið útbúgving sum kokkur ella tænari,
2) er myndugur og ikki undir verjumáli eftir § 5 í ella undir samverjumáli eftir § 7 í verjumálslógini (anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven).
3) ikki er undir fíggjartroti,
4) hevur bústað í Føroyum ella innan fyri umveldisvídd Hoyvíkssáttmálans, og
5) ikki hevur víst tílíka atferð, at orsøk er at halda, at hann ikki fer at reka virksemið á fullgóðan hátt.
*Stk. 2.* Er virksemið skipað sum íognarfelag (samognarfelag) ella

kommandittfelag, skulu allir ábyrgdarar lúka treytirnar í stk. 1, nr. 1-5.

*Skeinkiloyvi til feløg*

**§ 12.** Skeinkiloyvi kann veitast feløgum o.tíl., um stjórnin og helvtin av nevndarlimunum lúka treytirnar í § 11, stk. 1. Loyvisnevndin skal hava boð um broytingar í stjórn ella nevnd.
*Stk. 2.* Ein fyritøka, sum hevur skeinkiloyvi, skal rekast av loyvishavaranum sjálvum ella av einum leiðara. Er loyvishavarin eitt felag eftir stk. 1, skal fyritøkan rekast av einum leiðara. Leiðarin skal lúka treytirnar í § 11, stk. 1 og skal vera góðkendur av Loyvisnevndini.
*Stk. 3.* Loyvisnevndin kann góðkenna ein fyribilsleiðara í eitt avmarkað tíðarskeið. Leiðarin og fyribilsleiðarin hava somu revsirættarligu ábyrgd fyri rakstrinum sum loyvishavarin.
*Stk. 4.* Skip í heimasigling, bussar, sum koyra við ferðafólkum, tó ikki rutukoyring, og annað virksemi, sum kann sammetast við hetta, kann fáa skeinkiloyvi eftir stk. 1-3.

*Viðgerð Loyvisnevndarinnar*

**§ 13.** Loyvisnevndin skal í viðgerð síni hava fyrilit fyri samfelagsligum, fráhaldsligum, skilhaldsligum og øðrum viðkomandi viðurskiftum. Dentur skal serliga leggjast á hesi viðurskifti:
1) Um umsøkjarin sjálvur, stjórnar- og nevndarlimir ella onnur, ið kunnu hava avgerandi ávirkan á raksturin, hava sýnt tílíkan atburð, at orsøk er at halda, at virksemið ikki fer at verða rikið á fullgóðan hátt.
2) Handilsligu og fíggjarligu førleikar umsøkjarans, fíggjarætlan, rakstrarætlan og gjaldførisætlan, undir hesum eisini um metast má, at umsøkjarin er førur fyri at reka virksemi á fullgóðan hátt og í samsvari við tær reglur, sum eru galdandi fyri hetta virksemi.
3) Stødd á og slag av virksemi, sbr. § 1, stk. 3, og hvar virksemið er staðsett.
4) Ítøkilig fráhaldslig og onnur at hesum knýtt sosial og skilhaldslig sjónarmið.
*Stk. 2.* Loyvisnevndin kann frá politinum fáa til vega upplýsingar um viðurskifti, nevnd í § 11, stk. 1, nr. 5, og § 13, stk. 1, nr. 1-2.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um útskeinking av rúsdrekka, undir hesum eisini reglur um gjald fyri matstovuloyvi og skeinkiloyvi.

*Burturfall av skeinkiloyvi*

**§ 14.** Skeinkiloyvi fellur burtur, tá
1) loyvishavarin doyr, sbr. tó stk. 3,
2) skeinkiloyvið er útgingið, uttan at skeinkiloyvið er endurnýggjað,
3) loyvishavarin ikki longur brúkar skeinkiloyvið, og tá
4) loyvishavarin ikki longur lýkur treytirnar í § 11, stk. 1 og § 12, stk. 1-2.
*Stk. 2.* Loyvishavari skal kunna Loyvisnevndina, um skeinkiloyvið ikki verður brúkt. Loyvishavari skal kunna Loyvisnevndina, um hann ikki longur lýkur treytirnar í § 11, stk. 1 og § 12, stk. 1-2.
*Stk. 3.* Doyr loyvishavarin, hevur eftirsitandi hjúnafelagi ella sambúgvi rætt til at taka yvir skeinkiloyvið, um samlívið hevur vart til deyða loyvishavarans, og um viðkomandi annars lýkur treytirnar í § 11, stk. 1.
*Stk. 4.* Loyvisnevndin kann loyva eftirsitandi hjúnafelaga ella sambúgva at taka yvir skeinkiloyvið hjá loyvishavara eftir stk. 3, hóast viðkomandi ikki hevur fylt 25 ár.
*Stk. 5.* Loyvisnevndin kann játta einum deyðabúgvi, einum hjúnafelaga í óskiftum búgvi, einum trotabúgvi ella einum verja hjá einum, ið komin er undir verjumál eftir § 5 í verjumálslógini, at halda fram við fyritøkuni hjá tí deyða, hjá trotabúnum ella hjá honum, ið komin er undir verjumál eftir § 5 í verjumálslógini, um virksemið verður at halda uppat, verður latið av hondum o.tíl. Loyvið kann bara verða givið í upp í eitt ár eftir, at loyvishavarin er deyður, at trotaúrskurðurin er gjørdur, ella eftir at viðkomandi kom undir verjumál

eftir § 5 í verjumálslógini. Í heilt serligum føri ber til at víkja frá hesi freist.
*Stk. 6.* Góðkenning av leiðara fellur burtur, um viðkomandi ikki longur lýkur treytirnar í § 11, stk. 1, nr. 1-5.

*Afturtøka av matstovuloyvi og skeinkiloyvi*
**§ 15.** Hava loyvishavarin ella leiðarin brotið reglurnar í hesi lóg, reglur ásettar við heimild í hesi lóg ella treytirnar í loyvinum, kann Loyvisnevndin taka loyvið aftur. Loyvið kann eisini verða tikið aftur, um virksemið verður rikið á slíkan hátt, at tað elvir til drykkjuskap ella revsiverdar gerðir, og annaðhvørt politiið ella Loyvisnevndin frammanundan hava ávarað loyvishavaran.
*Stk. 2.* Loyvishavarin ella leiðarin kann krevja, at avgerðin eftir stk. 1 skal verða løgd fyri dómsvaldið. Avgerðin skal innihalda upplýsing um rættin til at leggja avgerðina fyri dómsvaldið og um kærufreist.
*Stk. 3.* Landfútin skal hava boð um krav eftir stk. 2 í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina. Málið verður lagt fyri dómsvaldið eftir reglunum í § 78, stk. 3 í lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939: straffeloven.
*Stk. 4.* Áheitan eftir stk. 2 hevur steðgandi virknað. Kortini kann rætturin í úrskurði avgera í hvønn mun, viðkomandi kann fáa loyvi til at halda fram við virkseminum, meðan málið verður viðgjørt. Rætturin kann í úrskurði gera av, at kæra ikki er steðgandi.

*Upp- og afturlatingartíðir*
**§ 16.** Matstovur og skeinkingarstøð, har almenningurin hevur atgongd, skulu sunnudag til hósdag vera afturlatin millum kl. 24:00 og 05:00. Kommunan kann gera av at leingja upplatingartíðina til kl. 02:00.
*Stk. 2.* Matstovur og skeinkingarstøð, har almenningurin hevur atgongd, skulu leygarmorgun og sunnumorgun lata aftur kl. 04:00.
*Stk. 3.* Á gistingarhúsum er loyvt at borðreiða við mati og drekka í afturlatingartíðini, nevnd í stk. 1, fyri teimum, ið gista á gistingarhúsinum.
*Stk. 4.* Við serlig høvi, t.d. nýggjársaftan, á føstulávint, á ólavsøku, á summarstevnum og aðrar serligar dagar, kann avvarðandi kommuna loyva, at vikið verður frá afturlatingartíðunum, nevnd í stk. 1 og 2.
*Stk. 5.* Loyvisnevndin kann, áðrenn virksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 2-5 byrjar, gera av, at virksemi skal steingja, áðrenn vanliga afturlatingartíðin eftir stk. 1 og 2 byrjar, um tað er neyðugt í mun til fyrilitið fyri umhvørvi, náttarfriði og almennum skilhaldi ella av fráhaldsligum orsøkum.
*Stk. 6.* Politiið kann eftir fyrilitunum, nevnd í stk. 4, alt fyri eitt avmarka upplatingartíðirnar fyri virksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 2-6 í upp í 30 dagar. Loyvisnevndin skal skjótast til ber eftir hetta taka avgerð um upplatingartíðirnar, sbr. stk. 4.
*Stk. 7.* Í afturlatingartíðini er ikki loyvt at borðreiða við mati og drekka ella at skeinkja rúsdrekka. Í seinasta lagi 15 minuttir fyri afturlatingartíðina skal øll søla halda uppat.
*Stk. 8.* Í afturlatingartíðini er kortini loyvt at borðreiða og skeinkja fyri feløgum o.tíl., har almenningurin ikki hevur atgongd, um borðreiðingin og skeinkingin fara fram í veitsluhølum, sum ikki eru partur av vanliga hølinum, har virksemið verður rikið.

*Almennar ásetingar*
**§ 17.** Landsstýrismaðurin kann í ávísum økjum ella í øllum landinum, um tað er neyðugt vegna almennan frið og alment skilhald, fyribils banna, at rúsdrekka verður selt ella borðreitt á støðum við skeinkiloyvi.

**§ 18.** Á støðum, har virksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 1-6, verður rikið, er bannað at halda gang ella at sýna harðligan ella óhøviskan atburð, ið ger seg inn á almenna friðin ella hevur við sær ampa fyri tey, sum eru á staðnum ella sum búgva nær við.
*Stk. 2.* Loyvishavarin ella umboð hansara skal átala atburð, nevndur í stk. 1, og kann

um neyðugt vísa viðkomandi burtur frá staðnum ella boða politinum frá.
*Stk. 3.* Um bardagi ella annað óskil hevur verið á staði, har virksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 2-6, verður rikið, kann politiið steingja staðið restina av degnum.
*Stk. 4.* Metir politiið, at tað á staði, har virksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 2-6, verður rikið, er serligur vandi fyri harðligum atburði, kann politiið av trygdarávum krevja, at staðið verður innrættað á ávísan hátt. Er innrættingin ikki broytt innan eina hóskandi freist, sum politiið ásetur, kann politiið avgera, at staðið verður latið aftur, til viðurskiftini eru fingin í rættlag.

**§ 19.** Politiið hevur, verður tað mett neyðugt, uttan rættarúrskurð, altíð rætt til atgongd til høli, sum eru partur av virksemi, ið er fevnt av hesi lóg. Hetta er kortini ikki galdandi fyri kømur, sum eru leigað út til gisting.

*Kærur*

**§ 20.** Avgerðir Loyvisnevndarinnar kunnu ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.
*Stk. 2.* Avgerð um góðkenningar, sum ávikavist Heilsufrøðiliga starvsstovan og Brunaeftirlitið taka, kunnu kærast samsvarandi teirri lóggávu, sum avgerðin er tikin eftir.
*Stk. 3.* Avgerðir, sum politiið tekur, vera at viðgera eftir reglunum, sum eru galdandi fyri politiið.

*Freistir*

**§ 21.** Tær freistir, sum eru ásettar í hesi lóg, ella í reglum, givnar við heimild í hesi lóg, byrja at ganga dagin eftir, at gerðin, sum útloysir freistina, fer fram. Hetta er galdandi fyri bæði dags-, viku, mánaðar- og ársfreistir.
*Stk. 2.* Er freistin ásett í vikum, er freistin, sbr. stk. 1, farin vikudagin eftir tann dag, freistin byrjaði at ganga.
*Stk. 3.* Er freistin ásett í mánaðum, er freistin, sbr. stk. 1, farin mánaðardagin eftir tann dag, freistin byrjaði at ganga. Er gerðin, sum útloysir freistina, framd seinasta dagin í einum mánaði, ella gongur freistin út ein mánaðardag, sum ikki er til, er freistin altíð farin seinasta dagin í mánaðinum, líka mikið hvussu langur mánaðurin er.
*Stk. 4.* Er freistin ásett í árum, er freistin, sbr. stk. 1, farin ársdagin eftir tann dag, freistin byrjaði at ganga.
*Stk. 5.* Um freistin gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, jólaaftansdag ella nýggjársaftansdag, verður freistin longd til fyrsta gerandisdag eftir hetta.

*Revsing*

**§ 22.** Um ikki hægri revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, verður við sekt ella við fongsli í upp í eitt ár revsaður tann, ið brýtur ásetingarnar í § 2, stk. 6-8, § 3, § 4, § 5, § 6, stk. 4, § 12, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2, § 14, stk. 2, 2. pkt., og § 16, stk. 6. Medvirkni verður revsað á sama hátt.
*Stk. 2.* Við sekt ella fongsli í upp í eitt ár verður revsaður tann, sum
1) setur til viks treytir í skeinkiloyvinum, sbr. § 10, stk. 1, ella treytir í øðrum loyvum ella góðkenningum, sbr. § 2,
2) ikki lýður boð ella forboð, givin eftir lógini ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini.
*Stk. 3.* Í reglum, givnar við heimild í lógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar ella treytir, givnar eftir reglunum, verður revsað við sekt ella fongsli í upp í eitt ár.
*Stk. 4.* Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini.
*Stk. 5.* Tá ið sekt verður ásett eftir stk. 1-2, ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini, skal fyrilit havast fyri fíggjarliga vinninginum, sum er fingin ella ætlaður var at fáa við brotinum.
*Stk. 6.* Tann, ið stendur fyri virksemi eftir hesi lóg, kann verða revsaður við sekt fyri brot á ásetingarnar í § 4, stk. 1-2 og § 16, stk. 7, 2. pkt., uttan mun til, um brotið er framt av starvsfólki og uttan mun til, um brotið er tilætlað ella framt av grovum ósketni.

*Stk. 7.* Mál, sum verða viðgjørd eftir hesum reglum, ella eftir reglum, sum eru ásettar í kunngerð við heimild í hesum reglum, verða viðgjørd sum politimál. Tey í bekendtgørelse af lov for Færøerne om rettens pleje nevndu tiltøk í kap. 72 um at leggja hald á og kap. 73 um rannsakan kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

*Gildiskoma og skiftisreglur*

**§ 23.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fara úr gildi § 7, stk. 2, 2. pkt., § 8, § 9, § 10, § 11, § 12, § 12a, § 13, § 14, § 15, § 16, § 17, stk. 3, § 18, § 21 og § 22, stk. 5 í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka og § 5 í Kongelig Anordning nr. 441 af 21. november 1923 hvorved lov nr. 353 af 7. august 1922 om den offentlige Fred paa Folkekirkens Helligdage samt Grundlovsdagen sættes i kraft paa Færøerne.
*Stk. 2.* Kunngerðir, givnar við heimild í § 8, stk. 2, § 9, stk. 4, og § 13 í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka vera verandi í gildi, til tær verða settar úr gildi.
*Stk. 3.* Skeinkiloyvi, givin við heimild í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka, vera verandi í gildi, til tey fara úr gildi sambært dagfestingini á loyvinum, ella tá ið tey av øðrum orsøkum fara úr gildi.
*Stk. 4.* Í løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka verður § 22 stk. 1, nr. 1 orðað soleiðis: "1) brýtur ásetingarnar í § 3, § 5, § 6, og § 7, stk. 1, ella".

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Politiið hevur í fleiri umførum víst á, at tað er óheppið, at politiið bæði viðger og letur matstovuloyvi, samstundis sum politiið skal hava eftirlit við, at treytirnar í loyvinum verða hildnar. Afturat tí eru reglurnar í dag skipaðar soleiðis, at fleiri ymiskir myndugleikar skulu veita fleiri ymisk loyvi í sambandi við matstovu- og skeinkingarvirksemi. Tískil verður skotið upp at gera hesa umsóknarmannagongd meira einfalda og tíðarhóskandi. Mett verður, at hetta endamál best verður rokkið við at gera eina yvirskipaða lóg, sum á einum stað ásetur reglur fyri nevnda virksemi. Reglurnar, sum skipa matstovu- og skeinkingarvirksemi, eru ásettar í ymsari lóggávu, og tað tykist óneyðuga trupult at fara undir nýtt virksemi, eins og endurnýggjan av loyvum bæði er tíðarkrevjandi og bureaukratisk.

Tískil verður mett rættast at viðgera økið í síni heild soleiðis, at tað yvirskipað verður einfaldari at søkja um viðkomandi loyvi, eins og tað verður einfaldari at umsita og hava eftirlit við matstovu- og skeinkingarvinnuni.

Afturat hesum verður ásetingin í § 5 í halgidagslógini (Kongelig Anordning nr. 441 af 21. november 1923 hvorved lov nr. 353 af 7. august 1922 om den offentlige Fred paa Folkekirkens Helligdage samt Grundlovsdagen sættes i kraft paa Færøerne) strikað. Henda broyting hevur við sær, at tann avmarking í upp- og afturlatingartíðum, sum er galdandi ávís kvøld á árinum, verður strikað. Sambært ásetingini skulu almenn tiltøk halda uppat á midnátt kvøldið fyri ein halgidag. Henda áseting hevur ikki verið handhevjað í longri tíð, tí onnur regulering er komin í staðin fyri. Sum dømi um hetta kann nevnast, at loyvt er at skipa fyri dansi til kl. 04:00 sunnumorgun, hóast dansurin eftir § 5 skuldi hildið uppat á midnátt. Í somu grein er harumframt ásett, at loyvt er als ikki at skipa fyri almennum tiltøkum kvøldið fyri jóladag, páskadag og hvítusunnudag. Heldur ikki henda áseting hevur verið handhevjað til fulnar í longri tíð, og bæði matstovur og skeinkingstøð hava opið hesi kvøld, eins og skipað

verður fyri øðrum almennum tiltøkum. Forboðið hevur verið handhevjað á tann hátt, at loyvt hevur ikki verið at skipa fyri dansi ella at hava live tónleikaframførslur. Fyri at løgskipa ta siðvenju, sum hevur verið galdandi seinastu mongu árini, tá ið talan er um almen tiltøk og afturlatingartíðir kvøldið fyri ein heiligdag, verður skotið upp at strika ásetingina í § 5 í halgidagslógini. Aðrar broytingar verða ikki gjørdar í halgidagslógini. Av tí at talan bara er um eina einstaka broyting, er í samráð við Mentamálaráðið avgjørt at gera ta broytingina í hesum lógaruppskotinum.

Mett verður ikki, at hesar broytingar fara at hava við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið, eins og mett verður, at broytingarnar fara at hava við sær positivar umsitingarligar avleiðingar. Víst verður annars til viðmerkingarnar til *1.2. Galdandi lóggáva* og *1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum.*

**1.2. Galdandi lóggáva**

Fyri at fara undir matstovu- og skeinkingarvirksemi í dag krevst loyvi frá fleiri ymsum myndugleikum. Heilsufrøðiliga starvsstovan skal góðkenna køkin eftir heilsufrøðiligum reglum, kommunalu brunamyndugleikarnir skulu góðkenna hølini eftir brunareglunum, Loyvisnevndin skal veita skeinkiloyvi eftir rúsdrekkalógini, og politiið skal lata sonevnt alment loyvi (fyrr nevnt dansiloyvi), har aðrar treytir, m.a. upp- og afturlatingartíðir sambært halgidagslógini og politiviðtøkunum fyri ávikavist Tórshavnar kommunu og landkommunurnar, og aðrar treytir, verða ásettar. Afturat hesum skal kommunan sum heild taka støðu til ætlaða virksemið, og um kommunan tekur undir við, at ávíst virksemi verður rikið á ávísum staði. Flestu loyvini hava eina gildistíð upp á 5 ár, meðan gildistíðin í øðrum førum er 4 ár. Hetta gevur ávísar trupulleikar, tá ið loyvi skulu endurnýggjast.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Uppskotið hevur til endamáls at gera reglurnar um matstovu- og skeinkingarvirksemi einfaldari og meira tíðarhóskandi.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Meginendamálið við at skipa hesar reglur í einari lóg er at gera tað lættari at fara undir hesa vinnu, eins og tað verður lættari hjá teimum myndugleikum, sum skulu hava eftirlit við vinnuni, at meta um, hvørt ásettar treytir verða hildnar.

Samstundis er ætlanin er skilja ímillum ymisk sløg av virksemi soleiðis, at ymsar treytir verða settar, alt eftir hvat slag av virksemi, talan er um. Á henda hátt ber til at skilja í millum t.d. matstovur, kaféir, barrir ella vertshús, dansistøð og mentanarhús.

Í dag verður alt virksemi bólkað sum matstova, hóast meginvirksemið ikki er matstovuvinna, men annað virksemi, t.d. at skipa fyri dansi o.tíl. Mett verður óneyðugt at áseta strong krøv til køkin og umstøðurnar at gera mat annars á einum dansistaði ella í einum mentanarhúsi, tí meginendamálið er ikki matarsøla. Hinvegin verða strongu krøvini til køkin varðveitt, tá ið talan er um veruligt matstovuvirksemi. Virksemið, sum ikki hevur matarsølu sum meginendmál, t.d. eitt diskotek, skal kortini lúka strongu treytirnar, um diskoteksvirksemið eisini fevnir um at borðreiða við mati fyri gestunum. Eisini í slíkum førum verður skilt ímillum ymisk sløg av borðreiðing, og góðkenningin er ymisk, alt eftir um talan er um veruliga matgerð ella meira einfalda borðreiðing.

Tískil verður farið til eina skipan, har tað fer at bera til at býta matstovu- og skeinkiloyvini sundur á ymiskan hátt soleiðis, at loyvini samsvara við tað veruliga virksemið. Í hesum

sambandi er ætlanin at flyta skeinkiloyvisreglurnar úr rúsdrekkalógini og yvir í matstovulógina, eins og galdandi reglur um skeinkiloyvi verða eftirmettar og dagførdar.

Reglurnar um skeinkiloyvi og skeinking eru av fyrstan tíð settar í gildi við rúsdrekkalógini, t.e. løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 um innflutning og sølu av rúsdrekka. Treytirnar fyri at fáa skeinkiloyvi verða ikki broyttar, og umsøkjarin skal eins og áður lúka treytir um m.a. aldur, heimarætt, handilsligan førleika og atburð (vandel). Verður skeinkiloyvið latið einum felag, eru somu reglur galdandi fyri stjórn, part av nevndini og dagliga leiðaran.

Reglurnar um hissiniskeinking (hissiniloyvi) verða dagførdar og broyttar soleiðis, at loyvt verður persóni, sum lýkur omanfyrinevndu treytir fyri at vera loyvishavari, kann standa fyri skeinkingini, um talan einans er um at selja øl og cider við í mesta lagi 5,8 rúmsprosentum av alkoholi og borðvín við í mesta lagi 15 rúmsprosentum av alkoholi. Henda broyting er grundað á, at tað kann vera trupult og dýrt at fáa ein loyvishavara at standa fyri skeinkingini til hissini tiltøk. Broytingin er eisini grundað á, at tað er betri at hava skipaða skeinking til slík tiltøk heldur enn óskipaða skeinking.

Umsóknarmannagongdirnar og loyvistillutanin verða broyttar soleiðis, at Loyvisnevndin, heldur enn politiið, letur bæði matstovu- og skeinkiloyvi við støði í umsóknum. Umsøkjarin skal sjálvur fáa til vega øll viðkomandi loyvi, t.d. løggilding frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni og brunagóðkenning og nýtsluváttan frákommununi, og aðrar viðkomandi upplýsingar, m.a. upplýsingar um felagið, um skattlig viðurskifti o.a., og lata Loyvisnevndini hesar saman við umsóknini. Loyvisnevndin fær til vega ummæli frá kommununi og politinum. Somuleiðis fær Loyvisnevndini til vega sonevnda almenna revsiváttan, so Loyvisnevndin kann meta um, hvørt umsøkjarin lýkur treytina um hóskandi atburð.

Eins og frammanundan er tað politiið, sum hevur eftirlit við virkseminum, og tær heimildir, sum politiið hevur eftir rúsdrekkalógini frá 1992, eins og eftir øðrum viðkomandi reglum, serliga politiviðtøkunum, eru tær somu í hesum uppskoti.

Við hesum broytingum verður mett, at tað yvirhøvur verður lættari at fara undir matstovuvinnu, eins og tað verður lættari at fara undir annað stuttleikavirksemi, t.d. á mentanarøkinum, tí reglurnar sum heild gerast meira tíðarhóskandi.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá stjórnarráðunum, Bláa Krossi, Ferðavinnufelagnum, Fólkaheilsuráðnum, Føroya Landfúta, Heilbrigdi, Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Kommunufelag Føroya, Rúsdrekkasølu Landsins, TAKS, Vinnuhúsinum og Visit Faroe Islands.

Víst verður til hjálagda upprit um innkomin hoyringarsvar.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Landið ber kostnaðin av Loyvisnevndini, hvørs játtan í 2018 er 186 t.kr. Hóast uppgávan at veita matstovuloyvi verður løgd til Loyvisnevndina, verður í útgangsstøði ikki mett, at útreiðslurnar til Loyvisnevndina fara at vaksa.

Kommunan skal, eins og frammanundan, geva brunaváttan og nýtsluváttan, eins og kommunan skal ummæla ætlanina at hava ávíst virksemi á ávísum staði. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar verða sostatt tær somu sum eftir galdandi reglum.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Hóast uppgávan at veita matstovuloyvi verður løgd til Loyvisnevndina, verður mett, at uppgávan er somikið lítil í vavi, at hetta ikki fer at hava við sær umsitingarligar avleiðingar av týdningi fyri Loyvisnevndina og við tí landið.

Kommunan skal, eins og frammanundan, geva brunaváttan og nýtsluváttan, eins og kommunan skal ummæla ætlanina at hava ávíst virksemi á ávísum staði. Umsitingarligu avleiðingarnar fyri kommunurnar verða sostatt tær somu sum eftir galdandi reglum.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna á tann hátt, at umsóknarmanna-gongdin verður einfaldari og smidligari.

Uppskotið hevur ikki fíggarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Hoyvíkssáttmálin javnsetur fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Íslandi við fyritøkur, feløg og persónar við heimstaði í Føroyum.

Aðrir viðkomandi millumtjóðasáttmálar eru ikki á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við *Evropeiska mannarættindasáttmálan*, sbr. Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og *Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek*, sbr. Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at uppskotið fer at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ásetingar um revsing. Revsireglurnar eru at kalla tær somu sum eftir rúsdrekkalógini. Uppskotið hevur somuleiðis ásetingar um, at mál um brot á lógina og brot á reglur, givnar við heimild í lógini, verða viðgjørd sum politimál. Hetta merkir, at politiið

kann avgreiða mál við sektaruppskoti og á tann hátt sleppa undan at fara í rættin við hvørjum einstøkum broti. Fortreytin er tó, at tann skuldsetti uttanrættarliga játtar seg sekan í brotinum og góðtekur at rinda ásettu sektina.

Ásett er eisini, at tey í bekendtgørelse af lov for Færøerne om rettens pleje (rættargangslógin) nevndu tiltøk í kap. 72 um at leggja hald á og kap. 73 um rannsakan kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

Um ikki hægri revsing er uppiborin eftir lóggávuni annars, verða brot á ásetingar í lógini revsað við sekt ella fongsli í upp í eitt ár. Medvirki verður revsað á sama hátt. Í reglum, givnar við heimild í lógini, kann verða ásett, at brot á reglurnar ella treytir, givnar eftir reglunum, verður revsað við sekt ella fongsli í upp í eitt ár.

Revsað verða brot á treytir í skeinkiloyvum ella øðrum loyvum ella góðkenningum, givin eftir lógini ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini. Somuleiðis verður revsaður tann, sum ikki lýðir boð ella forboð, givin eftir lógini ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini.

Revsiábyrgd kann verða áløgd løgfrøðiligum persónum sambært reglunum í 5. kapitli í revsilógini. Tá ið sekt verður ásett eftir stk. 1-2, ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini, skal fyrilit havast fyri fíggjarliga vinninginum, sum er fingin ella ætlaður var at fáa við brotinum.

Somuleiðis er ásett, at tann, sum stendur fyri virksemi eftir hesi lóg, kann verða revsaður við sekt fyri brot á ávísar ásetingarnar uttan mun til, um brotið er framt av starvsfólki og uttan mun til, um brotið er tilætlað ella framt av grovum ósketni. Í hesum føri verður sostatt ásett víðka ábyrgdargrundarlag hjá tí, sum stendur fyri virkseminum (objektiv ábyrgd). Henda víðkaða ábyrgd er ikki treytað av, at viðkomandi sjálvur hevur brotið reglurnar ella hevur vitað, at reglurnar vórðu brotnar (subjektiv ábyrgd/culpa).

### 2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Eins og frammanundan verða matstovuloyvi latin uttan kostnað. Skeinkiloyvi verða latin móti gjaldi. Gjaldið er í løtuni 10 t.kr., og gildistíðin er 4 ár. Onnur gjøld verða ikki kravd, men heimild er at krevja gjald fyri hissiniloyvi og matstovuloyvi.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Treytin fyri at reka matstovu og/ella skeinkingarvirksemi er, at loyvi er fingið til tess frammanundan. Henda treyt er grundað á, at neyðugt er við ávísum almennum eftirliti við hesi vinnu, bæði í mun til ta vøru, sum verður boðin gestum, í mun til tey avgjøld, sum vinnan skal rinda landinum, og í mun til tær skyldur, m.a. við støði í rúsdrekkapolitikkinum, sum liggja á teimum, ið reka hetta virksemi.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?
Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um virksemi, sum er fevnt av lógini, undir hesum reglur um útskeinking av rúsdrekka, heruppií reglur um hissiniloyvi, um loyvi til ølsølu, um virksemi Loyvisnevndarinnar, og um gjald fyri at viðgera umsóknir. Hesar kunngerðarheimildir eru tær somu sum eftir rúsdrekkalógini frá 1992.

Afturat hesum fær landsstýrismaðurin heimild til fyribils at banna, at rúsdrekka verður selt ella borðreitt á støðum við skeinkiloyvi, um tað vegna almennan frið og alment skilhald er neyðugt. Henda áseting er í samsvari við ásetingina í rúsdrekkalógini frá 1992.
Uppskotið leggur ikki heimildir til annan landsstýrismann ella til kommunurnar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur politinum, uttan rættarúrskurð, heimild at gera eftirlit á støðum, ið hava matstovu- ella skeinkingarloyvi. Henda heimild er í samsvari við ta heimild, sum politiið frammanundan hevur havt eftir politiviðtøkunum fyri ávikavist Tórshavnar kommunu og landkommunurnar.

Henda heimild er grundað á, at neyðugt er við ávísum almennum eftirliti við hesi vinnu, bæði í mun til ta vøru, sum verður boðin gestum, í mun til tey avgjøld, sum vinnan skal rinda landinum, og í mun til tær skyldur, m.a. við støði í rúsdrekkapolitikkinum, sum liggja á teimum, ið reka hetta virksemi.

Fyri alment skilhald og almennan frið er eisini umráðandi, at politiið – í ávísum førum – hevur ótarnaða atgongd til støð, har virksemi, fevnt av hesi lóg, verður rikið.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1
Stk. 1 ásetur, at lógin er galdandi fyri matstovu- og gistingarhúsvirksemi og ølsølur. Virkisøkið er nágreinað í stk. 3, sbr. niðanfyri.

Sbrt. stk. 2 eru ásetingar lógarinnar galdandi fyri áhugafeløg og onnur feløg í tann mun, felagið ber brá av at vera vinnurekandi, ella har felagið móti gjaldi borðreiðir við mati og rúsdrekka fyri almenninginum.

Áhugafeløg, t.d. ítróttarfeløg og onnur frítíðarfeløg, sum hava ítrótt, sjónleik, sigling ella annað frítíðarvirksemi sum sítt meginendamál, og har limir tekna seg við tí endamáli at íðka hesi frítíðarítriv, eru ikki fevnd av lógini. Hetta merkir, at tiltøk sum ársveitslur o.a. ikki hava fyri neyðini tey loyvi, sum annars verða kravd eftir hesi lóg. Kortini er tað so, at skipa nevndu feløg fyri tiltøkum, har ætlanin er at skeinkja rúsdrekka fyri almenninginum, er neyðugt við hissiniloyvi, sbr. § 6.

Ølklubbar og onnur (frítíðar)feløg, sum hava sum meginendamál at borðreiða við mati og rúsdrekka fyri limum sínum, eru fevnd av lógini og skulu tí lúka tær treytir, sum verða settar slíkum virksemi. At atgongdin er avmarkað til tey, sum eru limir í felagnum, hevur ikki við sær, at felagið sleppur undan at lúka ásetingar lógarinnar.

Stk. 3 nágreinar virksemið, sum er fevnt av lógini. Virksemið, fevnt av lógini, er í fyrsta lagi býtt sundur í seks bólkar, sbr. § 3, nr. 1-6. Hesir bólkar nágreina og avmarka ymsu sløgini av virksemi, sum krevja loyvi frá almennum myndugleikum eftir hesi lóg ella aðrari viðkomandi lóggávu, t.d. matvørulógini. Annað virksemi og aðrar allýsingar og avmarkingar eru ásettar í nr. 7-10.

Orsøkin til hetta sundurbýtið er, at munur eigur at verða á teimum treytum, sum verða settar ymsa virkseminum, sum er fevnt av lógini. Víst verður til almennu viðmerkingarnar.

*Gistingarhúsvirksemi* eftir nr. 1 verður allýst sum *móttøka av gistandi við møguleika fyri borðreiðing*. Í hesum bólki eru øll gistingarhús, sum hava møguleika at borðreiða fyri gestunum. Ból og biti er eisini uppi í hesum bólki. Tað er ikki ein treyt, at borðreitt verður fyri gestunum; tað er nóg mikið, at møguleiki er til tess. Tað er eisini líkamikið, um tað bara verður borðreitt fyri gistandi, ella um onnur eisini kunnu koma at keypa sær mat á staðnum. Løgildingin frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni er lagað eftir tí virksemi, sum er á staðnum; er talan um einfalda borðreiðing, t.d. ájavnt við tað, sum verður boðið á eini kafé, er løggildingin øðrvísi enn um talan er um eina matstovu, sum er løggildað at hagreiða og viðgera allar matvørur.

*Matstovuvirksemi* eftir nr. 2 verður allýst sum *borðreiðing av mati og drykkjuvørum*. Í hesum bólki eru allar matstovur, sbr. tó niðanfyri um ávikavist *kafévirksemi* og *verthúsvirksemi*. Matstovur í hesum bólki kunnu vera ymiskar í slagi og vavi; avgerandi er, at meginvirksemi er at borðreiða við mati og drykkjuvørum, heruppií eisini rúsdrekka, fyri gestum.

Matstovur, har almenningurin ikki hevur atgongd, t.d. kantinur á einum arbeiðsplássi, eru ikki fevndar av hesi áseting uttan mun til, um starvsfólkini rinda fyri matin.

Takeaway-matarsøla og cateringvirksemi er ikki fevnt av hesi lóg. Matarsøla, sum fer fram á sølustøðum, har tað ikki ber til at eta matin á staðnum, er heldur ikki fevnd av lógini. Sum dømi um hetta kann nevnast matarsøla frá grillbúðum, bensinstøðum, pylsuvognum o.tíl.

Slíkar virkismatstovur, takeaway-matarsølur, cateringvirksemi o.tíl. skulu kortini annaðhvørt skrásetast ella løggildast eftir matvørulógini og reglum, givnar við heimild í matvørulógini.

*Kafévirksemi* eftir nr. 3 verður allýst sum *borðreiðing av einføldum mati og drykkjuvørum*. Ein kafé kann, í mun til eina matstovu, allýsast sum virksemi, sum hvørki er matstova ella vertshús/barr, og tí eru treytirnar fyri kafévirksemi ikki líka strangar sum treytirnar, sum verða settar matstovuvirksemi eftir nr. 1. Munurin er grundaður á, at vøran, sum verður seld, er einfaldari, og at kaféir upprunaliga hava spesialiserað seg í at selja kaffi og aðrar drekkivørur uttan alkohol.

*Diskoteksvirksemi* eftir nr. 4 verður allýst sum *høli, sum annaðhvørt hevur eitt fast dansigólv ella har skipað verður fyri dansi*. Høli, sum av og á verða brúkt til dans, t.d. ítróttarhallir og bygdarhús, eru ikki fevnd av hesi áseting. Skeinkiloyvi til disktoteksvirksemi er ikki treytað av, at matur verður seldur á staðnum.

*Vertshúsvirksemi* eftir nr. 5 verður allýst sum *høli, har tað bara ella mestsum bara verður skonkt rúsdrekka*. Høvuðsendamálið er at selja rúsdrekka, men vertshúsið kann eisini selja t.d. heilt einfaldan mat, ið er pakkaður í verðar, tá ið hann verður latin keyparanum, ella munnbitar, t.d. nøtir ella kips. Skeinkiloyvi til vertshúsvirksemi er sostatt ikki treytað av, at matur verður seldur á staðnum.

*Mentanarligt virksemi* eftir nr. 6 verður allýst sum *søvn, biografar, sjónleikarhús o.tíl*. Á slíkum støðum er ikki vanligt at selja mat, men siðvenja er, kanska serliga í sjónleikarhúsum, at áskoðararnir kunnu keypa sær eitt glas av víni. Saman við víni fáast ofta munnbitar, og neyðugt er ikki við beinleiðis matstovuloyvi fyri at bjóða ella selja gestunum nøtir ella kips.

*Hissiniskeinking* eftir nr. 7 verður allýst sum *skeinking til einstøk, ikki afturvendandi, tiltøk, sum eru á støðum, ið ikki hava skeinkiloyvi*. Til slík tiltøk verður latið eitt sonevnt hissiniloyvi, sbr. § 6. Tiltøk, sum kunnu fáa hissiniloyvi eftir hesi áseting, eru bara avmarkað av orðingini sjálvari, t.d. at talan skal vera um einstøk, ikki afturvendandi, tiltøk. Slík tiltøk eru t.d. almennur dansur, konsertir, summarstevnur og onnur almenn tiltøk, har staðið, ið tiltakið verður hildið, ikki hevur skeinkiloyvi frammanundan. Eitt hissiniloyvi er sum so ikki avmarkað í tíð, tí eitt tiltak kann vara í fleiri dagar. Kortini skal ikki vera talan um virksemi, sum er so mikið støðugt, at talan í roynd og veru er um eitt varandi skeinkiloyvi.

*Rúsdrekka* eftir nr. 8 verður allýst sum *allur løgur, sum í sær hevur í minsta lagi 2,8 rúmprosent av alkoholi*. Heilivágur, uttan mun til alkoholinnihald, sum bara apotekið kann selja eftir apotekaralóggávuni, er ikki fevndur av hesi lóg. Ethanol, sum verður innflutt at brúka til rúsdrekkaframleiðslu, er heldur ikki fevnt av hesi áseting, sbr. ásetingarnar í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka.

*Borðreiðing* eftir nr. 9 verður allýst sum *at selja mat og drykkjuvørur, ið skulu nýtast á sølustaðnum ella við sølustaðið*. Takeaway-matarsøla er ikki at meta sum borðreiðing, eins og søla frá t.d. grillbúðum, bensinstøðum og pylsuvognum heldur ikki er at meta sum borðreiðing eftir hesi áseting.

*Ølsøla* eftir nr. 10 verður allýst sum *bryggjarí, sum á egnum sølustøðum selja egna framleiðslu við í mesta lagi 5,8 rúmprosentum av alkoholi*. Bryggjarí hava, síðani rúsdrekkalógin kom í 1992, havt møguleika at selja sína egnu framleiðslu beinleiðis til brúkaran frá egnum sølustøðum kring landið. Loyvi eru avmarkað til framleiðslu, sum í mesta lagi er gullstyrki, t.e. 5,8 rúmprosent av alkoholi. Loyvisnevndin veitir bryggjaríunum sølu- og útflýggjanarloyvi; hesi loyvi eru ikki tíðaravmarkað eins og skeinkiloyvini.

**Til § 2**
Høli, sum skulu brúkast til matstovu ella skeinkingarstað, sbr. § 1, stk. 3, nr. 1-3, skulu løggildast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni eftir løgtingslóg um matvørur og reglum, givnar við heimild í matvørulógini. Løggildingin, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan gevur, er, saman við øðrum løggildingum og góðkenningum, grundarlag undir tí matstovuloyvi, sum krevst til virksemi, sbr. stk. 3.

Løggildingin frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni er avmarkað til gistingarhúsvirksemi, matstovuvirksemi og kafévirksemi, tí hesar reglur hava serliga til endamáls at tryggja, at maturin ikki er heilsuskaðiligur at eta.

Omanfyrinevnda avmarking er grundað á, at diskoteksvirksemi, vertshúsvirksemi og mentanarligt virksemi ikki hava matstovu ella matarsølu sum sítt meginvirksemi, og at tað tí er óneyðugt at krevja matstovuloyvi til tað veruliga virksemi, sum er at skipa fyri dansi, at selja rúsdrekka og at bjóða mentanarlig tiltøk. Kortini verður ásett, at hetta virksemið skal skrásetast av Heilsufrøðiligu starvsstovuni, so greitt er, at talan er ikki um virksemi, ið krevur løggilding.

Fara diskotek, vertshús og mentanarhús seinni eisini at fáast við matstovuvirksemi, skulu tey hava løggilding frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni eftir hesi áseting.

Høli, sum verða brúkt til virksemi, nevnt í § 1, stk. 3, nr. 1-6, skulu harumframt góðkennast av brunamyndugleikunum eftir byggilógini (løgtingslóg nr. 60 frá 15. mai 2012 um at byggja bygningar o.a.) og reglum, givnar við heimild í byggilógini. Brunamyndugleikin er í allarflestu førum einstaka kommunan; bert um talan er um eldhættisligt virksemi o.tíl., er tað Brunaeftirlit landsins, sum skal geva brunagóðkenningina. Hesar reglur hava til endamáls at tryggja, at hølini eru egnað til ætlaða virksemið, og at eitt nú hóskandi rýmingarvegir eru, tí skaðin kann gerast stórur, um nógv fólk eru savnað á einum stað, og neyðugt verður at rýma.

Loyvisnevndin samskipar umsóknir um og útskrivar endaligt loyvi til virksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 1-6. Loyvini, sum talan er um, eru matstovuloyvi og skeinkingarloyvi. Umsøkjarin skal fáa til vega viðkomandi góðkenningar o.a., sum Loyvisnevndin hevur fyri neyðini fyri at viðgera umsóknir um matstovuvirksemi og skeinkingarvirksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 1-3 og umsóknir um skeinkingarvirksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 4-6. Víst verður til viðmerkingarnar til §§ 11-12.

Tá umsøkjari hevur fingið allar viðkomandi upplýsingar til vega, verður umsókn um annaðhvørt matstovuloyvi, skeinkiloyvi ella matstovu- og skeinkingarloyvi send Loyvisnevndini at viðgera.

Áðrenn Loyvisnevndin letur endaligt matstovu- og skeinkiloyvi, skal ummæli fáast frá politinum og avvarðandi kommunu. Loyvisnevndin fær til vega hesi ummæli.

Matstovu- og skeinkingarloyvi eftir stk. 4 hava gildi í 4 ár frá dagfestingini á loyvinum at rokna. Søkjast skal um endurnýggjan í seinasta lagi 3 mánaðir fyri, at loyvið fer úr gildi. Er ikki søkt um endurnýggjan innan hesa freist, verður virksemið mett sum hildið uppat. Avleiðingin av hesum er, at loyvt er ikki at borðreiða við mati og drekkivørum ella at skeinkja rúsdrekka. Politiið hevur eftirlit við hesum.

Matstovu- og skeinkingarloyvi eftir stk. 4 skulu altíð endurnýggjast eftir reglunum í stk. 1-3, tá munandi umbyggingar eru gjørdar, tá hølini hava verið brúkt til annað endamál enn tað, sum loyvið varð givið til, og tá virksemið verður yvirtikið og rikið av øðrum enn upprunaliga loyvishavaranum.

Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti, kann virksemið halda fram, meðan umsóknin um endurnýggjan verður viðgjørd.

Umsøkjarin hevur ábyrgd av at søkja um góðkenningar og loyvi, sum møguliga eru kravd eftir aðrari lóggávu. Loyvt er ikki at fara undir virksemi, fevnt av hesi lóg, fyrr enn øll viðkomandi loyvi eru fingin til vega.

**Til § 3**
Ásett verður, at loyvt er bara at skeinkja rúsdrekka á støðum við skeinkiloyvi. Ásetingin er í samsvari við tað, sum varð ásett í rúsdrekkalógini frá 1992. Virksemið á staðnum skal vera fevnt av í minsta lagi einari av allýsingunum í § 1, stk. 3, nr. 1-6. Reglurnar í §§ 3-5 koma afturat reglunum í § 2, um talan er um virksemi, sum hevur matstovu- ella gistingarhúsvirksemi afturat skeinkingarvirkseminum. Er talan bara um skeinkingarvirksemi, galda reglurnar í §§ 3-5 sjálvstøðugt.

Skeinkingarvirksemi er øðrvísi enn annað vinnuvirksemi, og treytin fyri at reka skeinkingarvirksemi er, at loyvi er fingið til tess frammanundan. Henda treyt er grundað á, at neyðugt er við ávísum almennum eftirliti við hesi vinnu, bæði í mun til ta vøru, sum verður boðin gestum, í mun til tey avgjøld, sum vinnan skal rinda landinum, og í mun til tær skyldur, m.a. við støði í rúsdrekkapolitikkinum, sum annars liggja á teimum, ið reka hetta virksemi.

Sum nakað nýtt verður beinleiðis ásett, at privat tiltøk, har almenningurin ikki hevur atgongd, kunnu haldast á støðum, sum hava skeinkiloyvi. Frammanundan hevur ivi verið um, nær hetta hevur verið loyvt, og umsitingin hevur verið hon, at tey støð, sum høvdu sonevnd veitsluhøli, sum ikki vóru í sama rúmi sum barrin, kundu hava slík tiltøk. Í roynd og veru merkti tað, at bara hotellini kundu hava slík tiltøk. Hildið verður, at hetta setur onnur, sum hava skeinkiloyvi, í eina verri kappingarstøðu, tí hesi kunnu ikki bjóða seg fram at halda privat tiltøk. Til tess at beina burtur allan iva um hesi viðurskifti verður greitt ásett, at hetta virksemið er loyvt.

Ein annar trupulleiki, sum hevur tikið seg upp, eru privat tiltøk, sum eru ætlað ungum undir 18 ára aldur. Higartil hevur ikki borið til at hildið slík tiltøk á støðum, sum hava skeinkiloyvi. Hetta er grundað á, at loyvt er ikki at skeinkja fyri ungum undir 18 ára aldur. Úrslitið hevur verið, at tiltøk av hesum slagi hava verið hildin á støðum, sum ikki hava skeinkiloyvi, t.d. í bygdarhúsum, ítróttarhúsum o.tíl. Tiltøkini hava í stóran mun verið hildin uttan nakað eftirlit, og tað hevur í ávísum førum elvt til trupulleikar við herverki, eins og ungfólk onkuntíð hava verið so drukkin, at tey eru komin illa fyri. Tey, sum hava skeinkiloyvi, hava í fleiri umførum víst á, at tað hevði verið betri, um slík tiltøk vóru hildin á støðum við skeinkiloyvi; umstøðurnar eru gjørdar til slíkt virksemi, og vaktir og ábyrgdarfólk eru á staðnum og kunnu taka sær av teimum trupulleikum, sum kunnu koma. Samanumtikið verður mett, at tað er betri, at tiltøkini verða hildin undir skipaðum viðurskiftum, og tí verður loyvt skeinkiloyvishavarum at brúka hølini til slíkt virksemi; forboðið fyri at selja, lata ella bjóða rúsdrekka til ung fólk undir 18 ára aldur stendur kortini við, sbr. § 4, stk. 1, og loyvishavararnir skulu tryggja, at rúsdrekka ikki verður selt, latið ella boðið teimum, sum ikki hava aldur til tess.

Upp- og afturlatingartíðirnar, ásettar í § 16, eru galdandi á sama hátt fyri hesi tiltøk; henda áseting er grundað á, at talan er um virksemi, sum er fevnt av einum almennum loyvi, og at tað tí eru ávís viðurskifti, m.a. í mun til náttarfrið o.tíl., sum skulu vera í lagi.

Ásetingin forðar ikki fyri, at slík tiltøk verða hildin á støðum, sum ikki hava skeinkiloyvi. Upp- og afturlatingartíðirnar, ásettar í § 16, eru ikki galdandi á støðum, sum ikki hava skeinkiloyvi, og sum verða brúkt til privat tiltøk, t.d. brúdleyp, føðingardagar o.a.

**Til § 4**
Reglurnar um at selja og lata rúsdrekka eru ásettar í § 4. Hildið verður fast við aldursmarkið upp á 18 ár, sum varð ásett í rúsdrekkalógini frá 1992. Á støðum við skeinkiloyvi hevur loyvishavarin skyldu til at gera vart við, at tað er bannað at skeinkja rúsdrekka fyri persónum, sum ikki hava fylt 18 ár. Hetta skal gerast við uppslagi á sjónligum staði. Tann, sum selur, letur, skeinkir ella letur skeinkja rúsdrekka, hevur skyldu til at tryggja sær, um neyðugt við at síggja samleikaprógv, at móttakarin lýkur aldurstreytina í stk. 1. Ásetingin er galdandi fyri øll, sum selja rúsdrekka, bæði Rúsdrekkasølu Landsins, bryggjarí, matstovur, skeinkingarstøð o.o., sum fáast við hetta virksemið.

§ 4 ásetur harumframt tær reglur, sum galda á støðum við skeinkiloyvi, eins og reglur eru ásettar fyri tey, sum standa fyri skeinkingini. Sum í rúsdrekkalógini frá 1992 er ásett, at loyvt er ikki at selja ella at lata persónum rúsdrekka, um hildið verður, at tey, við at drekka meira, kunnu vera sær sjálvum ella øðrum til vanda ella øðrum til ampa. Ásetingin fevnir eisini um tey føri, har loyvishavarin veit ella hevur illgruna um, at viðkomandi hevur bil við sær.

Afturat hesum skal loyvishavarin tryggja, at tað ber til at fáa aðrar drekkivørur enn rúsdrekka, t.d. við upplýsingum á príslista, vínkorti ella øðrum sjónligum uppslagi, eins og loyvishavarin við sjónligum uppslagi skal gera vart við, at tað ikki er loyvt gestunum at drekka rúsdrekka, sum teir hava havt við sær.

**Til § 5**
Ásett verður, at á støðum við skeinkiloyvi mugu fólk undir 18 ár ikki setast at skeinkja rúsdrekka. Kokka- og tænaralærlingar við góðkendum lærusáttmála, ella persónar, ið hava lokið alla lærutíðina í tænarafakinum, eru kortini ikki fevndir at hesi áseting. Undantakið er grundað á, at talan í fyrra førinum er um eina skipaða lærutíð. Í seinna førinum er undantakið grundað á, at talan er um ungfólk, sum hava lokið útbúgving á økinum.

Ásetingin er í samsvari við tað, sum er ásett í rúsdrekkalógini frá 1992.

**Til § 6**
Ásettar verða reglur um skeinking til støk tiltøk (hissiniskeinking). Í 2006 var rúsdrekkalógin broytt soleiðis, at loyvt varð at skeinkja til støk tiltøk. Frammanundan var einans loyvt at skeinkja rúsdrekka á støðum við skeinkiloyvi. Í viðmerkingunum til tingmál nr. 86/2005 verður m.a. sagt, at *Verandi rættarstøða virkar neyvan tálmandi upp á nýtsluna av rúsdrekka í sambandi við nevndu tiltøk, men elvir hinvegin heldur til, at drukkið verður undir óskipaðum viðurskiftum uttan eftirlit. Av tí, at rúsdrekka ikki kann keypast til hesi tiltøk, verður mangan drukkið ríkiligt, áðrenn farið verður heimanífrá, umframt at fólk hava rúsdrekka við sær. Henda støða er óvirðilig, og minnir rúsdrekkamentanin á hesum øki ikki so lítið um ta rúsdrekkamentan, vit kendu so væl í Føroyum fyrr, og sum roynt var at koma burturfrá við nýggju rúsdrekkalógini í 1992.*

*Núverandi skipan hevur eisini óhepnar avleiðingar við sær fyri trygdina til tey størru av umrøddu tiltøkum – her verður serliga hugsað um festivalarnar og størri dansikvøld, av tí at stórur vandi kann standast av teimum fløskum, sum fólk ofta hava við sær. Hóast tað ikki er loyvt, eru royndirnar hjá teimum, sum skipa fyri slíkum tiltøkum og standa fyri vaktar-haldinum, at tað ikki ber til at sleppa undan, at fólk hava fløskur við sær inn á økið [...]. Mett verður, at hesin trupulleiki hevði verið munandi minni, um loyvt var at skeinkja á staðnum. Hetta hevði samstundis gjørt tað møguligt at styrkt eftirlitið við teimum yngru, sum ikki hava aldur at keypa rúsdrekka á staðnum. Mett verður ikki, at skeinking á staðnum hevði økt um rúsdrekka nýtsluna – helst heldur hinvegin.*

Skipanin við hissiniloyvum, sum hevur verið í gildi síðani 2006, hevur virkað væl, og politiið fær yvirhøvur færri fráboðanir um trupulleikar og ólevnað, sum standast av rúsdrekka. Støðan tykist vera tann, at fólk drekka minni, tá ið tey vita, at tey kunnu keypa sær tað rúsdrekka, sum tey vilja hava, til tiltakið. Við støði í hesum hevur Loyvisnevndin eisini yvirhøvur veitt hissiniloyvi, tá ið søkt er um tað. Hissiniskeinking er ikki treytað av, at tað samstundis verður borðreitt við mati.

Hissiniskeinking verður eftir § 1, stk. 3, nr. 7 allýst sum *skeinking til einstøk, ikki afturvendandi, tiltøk, sum eru á støðum, ið ikki hava skeinkiloyvi*. Til slík tiltøk verður latið eitt sonevnt hissiniloyvi, sbr. § 6. Tiltøk, sum kunnu fáa hissiniloyvi eftir hesi áseting, eru bara avmarkað av orðingini sjálvari, t.d. at talan skal vera um einstøk, ikki afturvendandi, tiltøk. Slík tiltøk eru t.d. almennu dansur, konsertir, summarstevnur og onnur almenn tiltøk, har staðið, ið tiltakið verður hildið, ikki hevur skeinkiloyvi frammanundan. Eitt hissiniloyvi er sum so ikki avmarkað í tíð, tí eitt tiltak kann vara í fleiri dagar. Kortini skal ikki vera talan um virksemi, sum er so mikið støðugt, at talan í roynd og veru er um eitt varandi skeinkiloyvi.

Eftir galdandi reglum er tað ein treyt, at loyvishavari stendur fyri hissiniskeinkingini. Henda treyt er grundað á, at tað – við einum loyvishavara – betur verður tryggjað, at treytirnar fyri skeinking til støk tiltøk verða hildnar, og at tað er lættari at revsa brot á treytirnar. Afturat tí kann loyvishavari, sum stendur fyri slíkari hissiniskeinking, og sum ikki heldur treytirnar, missa sítt skeinkiloyvi. Henda meginregla verður varðveitt, men kortini verður gjørd tann broyting, at útskeinking, sum er avmarkað til øl ella cider við í mesta lagi 5,8 rúmprosentum av alkoholi og borðvín við í mesta lagi 15 rúmsprosentum av alkoholi, kann fyriskipast av persóni, sum ikki hevur skeinkiloyvi, men sum hevur fylt 25 ár.

Henda broyting er grundað á tvinnanda viðurskifti. Í summum førum er trupult at fáa ein loyvishavara at standa fyri skeinkingini, um talan er um tiltak á útoyggj, t.d. útoyggjastevnu, oyggjardagar o.tíl. Broytingin er eisini grundað á, at tað kann verða ein fíggjarlig tung byrða fyri t.d. eitt áhugafelag ella eitt íttróttarfelag, sum skipar fyri almennum dansi ella konsert fyri at fáa felagnum pening til virksemi, um felagið skal rinda einum loyvishavara eitt slag av leigugjaldi fyri at brúka skeinkiloyvi. Hildið verður, at verður skeinkingin avmarkað til øl, cider ella borðvín, slepst undan fleiri av teimum trupulleikum, sum kunnu standast av slíkari skeinking, tí sterkt rúsdrekka verður ikki skonkt. Treytin er tó, at ein ábyrgdarpersónur, sum í minsta lagi er 25 ára gamal, skal standa fyri skeinkingini. Ásetingarnar, sum annars eru galdandi fyri at skeinkja rúsdrekka, eru eisini galdandi í hesum førum, og ábyrgdarpersónurin hevur skyldu til at tryggja, at øll viðurskifti eru í lagi, sbr. stk. 4.

Ta tíðina, Loyvisnevndin hevur viðgjørt og játtað umsóknir um hissiniloyvi, hevur mannagongdin verið tann, at politiið er kunnað um loyvini; endamálið er at tryggja, at

politiið, sum hevur eftirlit við rúsdrekkalógini, er kunnað um tey tiltøk, sum fara fram, eins og politiið er kunnað um, hvør hevur ábyrgdina. Henda mannagongd verður nú løgskipað.

Heimilað verður landsstýrismanninum í kunngerð at áseta nærri reglur um hissiniloyvi, undir hesum eisini reglur um gjald fyri hissiniloyvi eftir stk. 1-2.

**Til § 7**
Ásetingin er í samsvari við ásetingin í § 8 í rúsdrekkalógini frá 1992. Í 1980 fingu føroysku bryggjaríni heimild at bryggja øl við upp til 4,6 rúmprosentum av alkoholi. Samstundis fingu bryggjarínini, eftir ávísum treytum, loyvi at selja sína egnu framleiðslu beinleiðis til brúkaran. Markið upp á 4,6 rúmsprosent er seinni hækkað til 5,8 rúmprosent. Møguleikin hjá bryggjaríunum at selja egna framleiðslu verður varðveitt, eins og markið upp á 5,8 rúmprosent av alkoholi verður varðveitt. Sostatt skal øll rúsdrekkaframleiðsla, ið er oman fyri 5,8 rúmprosent, seljast um Rúsdrekkasølu Landsins.

Loyvisnevndin veitir, eftir umsókn, loyvi til ølsølu beinleiðis frá bryggjaríunum. Loyvið er ikki tíðaravmarkað, og loyvið skal ikki endurnýggjast. Loyvið kann takast aftur eftir ásetingunum í § 14, um bryggjaríið hevur brotið treytirnar fyri loyvinum, ella um bryggjaríið ikki hevur hildið seg til tær reglur, sum galda fyri rúsdrekkasølu, t.d. við at selja til sjónliga ávirkað fólk, ella við at lata ungfólk undir 18 ára aldur keypa rúsdrekka. Ein afturtøka av hesum slag kann verða avmarkað til ávís sølustøð, men kann eisini, er grundarlag fyri tí, galda fyri alt søluvirksemið bryggjarísins, t.e. øll ølsøla beinleiðis til brúkaran.

Landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð at áseta nærri treytir fyri loyvi til ølsølu. Líknandi reglur eru ásettar í kunngerð nr. 153 frá 28. oktober 1992 um framleiðslu og útflýgging av rúsdrekka.

**Til § 8**
Ásetingin er í samsvari við ásetingina í rúsdrekkalógini frá 1992. Loyvisnevndin hevur 5 limir, sum landsstýrismaðurin tilnevnir. Í Loyvisnevndini skulu vera ein løgfrøðingur (cand. jur), sum er formaður, eitt umboð fyri politiið, eitt umboð fyri heilsumyndugleikarnar, t.d. fyri Fólkaheilsuráðið, ein grannskoðari og ein persónur við hollum kunnleika til matstovu- og gistingarhúsvinnuna, ið kortini ikki sjálvur skal vera vinnurekandi í hesi vinnugrein. Fyri hvønn av limunum verður tilnevndur ein tiltakslimur. Nevndarskeiðið er 4 ár hvørja ferð.

Landsstýrismanninum verður heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um virksemi Loyvisnevndarinnar. Líknandi reglur eru ásettar í kunngerð nr. 61 frá 7. mai 1992 um reglur fyri skeinkingarloyvisnevndina.

**Til § 9**
Loyvinevndin veitir matstovuloyvi. Loyvt er ikki at fara undir matstovuvirksemi, fyrr enn Loyvisnevndin hevur givið loyvi til tess.

Í útgangsstøði verður eitt matstovuloyvi latið fyri 4 ár í senn, sbr. § 2, stk. 5, men Loyvisnevndin kann eftir umstøðunum avmarka og treyta matstovuloyvi. Slíkar avmarkingar og treytir kunnu bert ásetast, um talan er um viðurskifti, sum ikki eru í lagi eftir matvørulógini ella reglum, givnar við heimild í matvørulógini.

Ásett verður, at søkjast skal um endurnýggjan í seinasta lagi 3 mánaðir fyri, at loyvið fer úr gildi. Tá ið talan er um at endurnýggja eitt matstovuloyvi krevst bert, at Heilsufrøðiliga

starvsstovan ger eftirlit á staðnum fyri at staðfesta, um viðurskiftini eru í lagi. 3 mánaðir eru nóg mikið at fáa til vega allar upplýsingar og møgulig onnur loyvi, men, um so er, at hetta av onkrari orsøk tekur longri tíð, verður ásett, at virksemið kann halda fram sum vant, meðan umsóknin verður viðgjørd. Hetta er ásett, so sleppast kann undan at steðga virkseminum, meðan endurnýggjanarumsóknin verður viðgjørd.

**Til § 10**
Loyvinevndin veitir skeinkiloyvi. Loyvt er ikki at fara undir skeinkingarvirksemi, fyrr enn Loyvisnevndin hevur givið loyvi til tess.

Í útgangsstøði verður eitt skeinkiloyvi latið fyri 4 ár í senn, sbr. § 2, stk. 5. Kortini kann Loyvisnevndin eftir umstøðunum avmarka og treyta skeinkiloyvi. Dømi um slíka avmarking kann vera, at skeinkiloyvi verður veitt fyri 2 ár heldur enn 4 ár. Grundarlagið undir slíkari avmarking kann eitt nú vera, at skeinkingarvirksemi hevur verið rikið við halli fleiri ár á rað ella at loyvishavarin ella felagið skyldar almenn gjøld, t.d. arbeiðsmarknaðargjøld ella skatt. Slík fíggjarlig viðurskifti kunnu benda á, at tað er trupult hjá loyvishavaranum at halda sínar skyldur móti tí almenna, serliga tá ið talan er um vinnu, har tað er lætt at fjala inntøkur fyri myndugleikunum. Í slíkum førum kann Loyvisnevndin t.d. seta sum treyt fyri loyvinum, at loyvishavarin letur Loyvisnevndini roknskap á hvørjum ári.

Eitt skeinkiloyvi er ein framíhjárættur, ið fæst frá tí almenna, og tí verða eisini treytir settar teimum, sum reka virksemi. Hetta merkir, at eitt skeinkiloyvi eisini kann verða treytað av, hvør stendur fyri virkseminum. Tann, sum stendur fyri skeinkiloyvinum, skal vísa ávísan atburð, og tí kann Loyvisnevndin eftir umstøðunum seta sum treyt, at ávísur persónur ikki stendur fyri virkseminum. Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 11 og § 13, stk. 1, nr. 1 og stk. 2.

Til skeinkingarvirksemi eru fleiri loyvi, sum skulu fáast til vega, áðrenn farast kann undir virksemi. Hesi loyvi eru skipað soleiðis, at skeinkiloyvi er tað seinasta loyvið, sum verður latið. Orsøkin er tann, at øll onnur viðurskifti, serliga hølisviðurskifti og brunavirksemi, men eisini avgerðin um, hvussu ætlaða virksemið skal verða bólkað eftir § 1, stk. 3, nr. 1-6. Tá hesi viðurskifti eru avgreidd, verður umsóknin um skeinkiloyvi viðgjørd og avgreidd.

Skeinkiloyvi skulu endurnýggjast í minsta lagi fjórða hvørt ár, sbr. kortini omanfyri, og søkjast skal um endurnýggjan í seinasta lagi 3 mánaðir fyri, at loyvið fer úr gildi. 3 mánaðir eru nóg mikið at fáa til vega allar upplýsingar og møgulig onnur loyvi, men, um so er, at hetta av onkrari orsøk tekur longri tíð, verður ásett, at virksemið kann halda fram sum vant, meðan umsóknin verður viðgjørd. Hetta er ásett, so sleppast kann undan at steðga virkseminum, meðan endurnýggjanarumsóknin verður viðgjørd.

**Til § 11**
Í § 11 verða ásettar treytirnar fyri, at skeinkiloyvi kann veitast persóni. Treytirnar eru tær somu sum í rúsdrekkalógini frá 1992. Eitt skeinkingarstað skal rekast av loyvishavaranum sjálvum ella einum dagligum leiðara. Er virksemið skipað sum ein fyritøka, skal loyvishavarin annaðhvørt sjálvur reka virksemið ella seta ein dagligan leiðara. Er virksemið skipað sum eitt felag, skal ein dagligur leiðari reka virksemið. Víst verður til viðmerkingar til § 12.

Fyri at taka støðu til, um umsøkjaranum kann verða játtað skeinkiloyvi, skulu allar viðkomandi upplýsingar latast Loyvisnevndini. Talan er um upplýsingar um aldur, heimarætt,

bústað, handilsligan førleika, fíggjarviðurskifti, staðseting og frágreiðing um hølini, har virksemi skal rekast. Hesar upplýsingar eru tær somu, sum verða kravdar eftir kunngerð nr. 60/1992 um skeingarloyvi.

Fyrsta treytin er, at umsøkjarin annaðhvørt hevur fylt 25 ár ella hevur staðið útbúgving sum kokkur ella tænari. Henda seinna treytin er grundað á, at lærutíðin í annaðhvørt kokka- ella tænarayrkinum verður mett at vera nóg góð at lúka aldurstreytina, hóast viðkomandi ikki hevur fylt 25 ár. Eftir nr. 2 er tað kortini ein treyt, at viðkomandi er myndugur.

Onnur treytin er, at viðkomandi er myndugur og ikki undir verjumáli eftir § 5 ella undir samverjumáli eftir § 7 í verjumálslógini (anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven). Verjumál eftir § 5 kann setast í verk vegna sinnissjúku, demenssjúku, vantandi sálarliga menning o.tíl., um hildið verður, at viðkomandi ikki er førur fyri at røkja síni egnu viðurskifti, undir hesum eisini fíggjarlig viðurskifti. Samverjumál eftir § 7 kann setast í verk, um hildið verður, at viðkomandi vegna vantandi vitan og royndir, ringa heilsu ella líknandi støðu, hevur tørv á hjálp at umsita ognir sínar ella at røkja onnur fíggjarlig viðurskifti.

Triðja treytin er, at viðkomandi ikki er undir fíggjartroti. Henda treyt er grundað á, at ivi kann vera um, hvørt viðkomandi er førur fyri at reka virksemið á skilagóðan og skynsaman hátt, um viðkomandi er undir fíggjartroti. Serliga viðkomandi í hesum føri eru almennu fíggjarligu skyldurnar, sum ein loyvishavari hevur.

Fjórða treytin er, at umsøkjarin skal hava bústað í Føroyum ella innan fyri umveldisvídd Hoyvíkssáttmálans. Treytin er at sammeta við tær treytir, sum verða settar líknandi virksemi, t.e. at tann, sum virkar eftir almennum loyvi, skal hava bústað í Føroyum. Eftir Hoyvíkssáttmálanum eru tey, sum hava bústað innan fyri umveldisvídd Hoyvíkssátmálans, t.e. í Føroyum og í Íslandi, at meta sum havandi bústað í Føroyum.

Fimta og seinasta treytin er, at umsøkjarin skal ikki hava víst tílíka atferð, at orsøk er at halda, at hann ikki fer at reka virksemi á fullgóðan hátt. Henda treyt kann m.a. fevna um tey føri, har umsøkjarin hevur fingið dóm fyri viðurskifti, sum hava beinleiðis samband við skeinkingarvirksemi, t.d. dóm fyri harðskap móti gestum ella starvsfólkum, sum er hendur á staðnum, revsing fyri brot á treytir í skeinkiloyvinum, eitt nú um skonkt er aftaná afturlatingartíð ella um skonkt er fyri ungfólkum undir 18 ára aldur, ella um viðkomandi ikki hevur hildið fíggjarligu skyldur sínar móti tí almenna, t.d. ikki hevur rindað skatt ella arbeiðsmarknaðargjøld. Treytin er kortini ikki avmarkað til hesi viðurskifti, og Loyvisnevndin kann í viðgerð síni taka við tey viðurskifti, sum Loyvisnevndin metir hava týdning fyri málið. Víst verður eisini til viðmerkingar til § 13, stk. 1, nr. 1 og 2, og § 15.

Sambært stk. 2 er galdandi, at allir ábyrgdarar skulu lúka treytirnar í stk. 1, nr. 1 -5, um virksemið er skipað sum íognarfelag (samognarfelag) ella kommandittfelag. Henda áseting er grundað á, at í íognarfeløgum (samognarfeløgum) og kommandittfeløgunum hefta allir ábyrgdarar í felag og til fulnar (in solidum) fyri øllum skyldum felagsins.

**Til § 12**
Í § 12 verða ásettar treytirnar fyri, at skeinkiloyvi kann veitast feløgum o.tíl. Treytirnar eru tær somu sum í rúsdrekkalógini frá 1992.

Skeinkiloyvi kann veitast feløgum o.tíl., um stjórnin og helvtin av nevndarlimunum lúka treytirnar í § 11, stk. 1. Víst verður til viðmerkingarnar til § 11, stk. 1. Loyvisnevndin skal hava boð um broytingar í stjórn ella nevnd, so tryggjað verður, at krøv lógarinnar eru lokin.

Er virksemið skipað sum fyritøka, skal loyvishavarin annaðhvørt sjálvur reka virksemið ella seta ein leiðara at reka virksemið. Er virksemið skipað sum felag, skal virksemið rekast av einum leiðari. Leiðarin skal lúka treytirnar í § 11, stk. 1 og skal vera góðkendur av Loyvisnevndini. Loyvisnevndin kann góðkenna ein fyribilsleiðara í eitt avmarkað tíðarskeið. Leiðarin og fyribilsleiðarin hava somu revsirættarligu ábyrgd fyri rakstrinum sum loyvishavarin sjálvur.

Eins og eftir rúsdrekkalógini frá 1992 verður ásett, at skip í heimasigling kunnu fáa skeinkiloyvi eftir somu treytum sum fyritøkur og feløg. Sum nakað nýtt verður ásett, at bussar, sum koyra við ferðafólkum, tó ikki rutukoyring, kunnu fáa skeinkiloyvi eftir somu treytum sum skip í heimasigling. Fleiri fyrispurningar hava verið hesum viðvíkjandi, serliga í sambandi við útlendsk ferðafólk í Føroyum, men heimild hevur ikki verið at lata slík loyvi. Vanligu reglurnar og treytirnar galda eisini fyri skeinkiloyvi til skip í heimasigling og til ferðafólkabussar, og víst verður tískil til viðmerkingarnar til §§ 3-5 og §§ 10-12.

Afturat ásetingini um, at skeinkiloyvi kann latast bussum, sum koyra við ferðafólkum, er ásett, at "annað virksemi, sum kann sammetast við hetta, kann fáa skeinkiloyvi eftir stk. 1-3". Tað virksemið, sum sipað verður til, eru t.d. pop-up matstovur og líknandi virksemi, sum er avmarkað í vavi og í tíð, t.e. virksemi, sum ikki er alt árið. Talan er ikki um pylsuvognar, matarvognar, kioskir, bensinstøðir o.tíl.

**Til § 13**
Loyvisnevndin viðger umsóknir um skeinkiloyvi. Í viðgerð síni skal Loyvisnevndin hava fyrilit fyri samfelagsligum, fráhaldsligum, skilhaldsligum og øðrum viðkomandi viðurskiftum. Hetta er ein yvirskipað áseting, sum kann vera trupul at greina neyvt, men talan er um eina samlaða meting av teimum viðurskiftum, sum kunnu hava týdning fyri samfelagið.

Orðingin er í samsvari við tað, sum varð ásett í rúsdrekkalógini frá 1992, og viðurskiftini tá vóru munandi øðrvísi enn í dag; tá varð farið frá eini skamtanarskipan, sum hóast síni lýti, hevði ávísar fyrimunir í mun til ta nøgd, sum varð konsumerað. Fleiri ivaðust í, um tað var rætt at sleppa skamtanarskipanini, og úrslitið – rúsdrekkalógin frá 1992 – ber í stóran mun brá av eini varligari broyting, tí farið varð til eina grundleggjandi øðrvísi skipan. Tíðin hevur víst, at verandi rúsdrekkaskipan við einkarsølu, almennum skeinkiloyvum og hissiniloyvum, hevur virkað væl, og at samfelagið var búgvið til hesa broyting. Kortini skal havast í huga, at skeinking og skeinkingarvirksemi eru ikki vanligt vinnuvirksemi, og tí má fyrilit havast fyri avleiðingunum, sum kunnu standast av slíkum virksemi.

Loyvisnevndin skal tí í viðgerð síni, eins og frammanundan, hava fyrilit fyri samfelagsligum, fráhaldsligum, skilhaldsligum og øðrum viðkomandi viðurskiftum. Loyvisnevndin hevur víðar heimildir at taka oman nevndu viðurskifti við í meting sína, og av somu orsøk er trupult at allýsa øll hugsandi saklig fyrilit, sum Loyvisnevndin kann brúka í viðgerð síni. Yvirskipað ber til at staðfesta, at rúsdrekka sum vøra skal handfarast við ávísum varsemi, og Loyvisnevndin skal ansa eftir, at skeinking á ávísum stað ella undir ávísum umstøðum ikki hevur óhepnar ella óumhugsaðar avleiðingar við sær. Nøkur ítøkilig viðurskifti verða nevnd í

ásetingini, og víst verður til viðmerkingarnar niðanfyri. Hesar viðmerkingar lýsa neyvari tey viðurskifti, sum Loyvisnevndin m.a. skal leggja dent á í viðgerð síni.

Loyvisnevndin skal í fyrsta lagi leggja dent á, um umsøkjarin sjálvur, stjórnar- og nevndarlimir ella onnur, ið kunnu hava avgerandi ávirkan á raksturin, hava sýnt tílíkan atburð, at orsøk er at halda, at virksemið ikki fer at verða rikið á fullgóðan hátt. Talan er um eina breiða orðing, men orðingin fevnir fyrst og fremst um revsirættarlig viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri raksturin. Eitt dømi er, um umsøkjari (loyvishavari) ella onnur, sum eru nevnd í ásetingini, eru í eftirstøðu til tað almenna fyri almennar skyldur, sum fylgja við vinnuvirksemi av hesum slagi, t.d. við ikki at rinda falnan skatt ella arbeiðsmarknaðargjøld. Eitt annað dømi kann vera, at loyvishavarin er dømdur fyri brot, sum eru framd í sambandi við skeinkingarvirksemi, t.d. fyri harðskap, framdur í sambandi við virksemið ella á staðnum.

Í øðrum lagi skal dentur leggjast á handilsligu førleikar og fíggjarligu viðurskifti umsøkjarans, undir hesum um metast má, at umsøkjarin er førur fyri at reka virksemi á fullgóðan hátt og í samsvari við tær reglur, sum eru galdandi fyri hetta virksemi. Í hesum føri verður hugt eftir fíggjarætlanini ella rakstrarætlanini, undir hesum um metast má, at talan er um eina realistiska ætlan, sum hevur lagt upp fyri teimum viðurskiftum, sum eru viðkomandi í hesi vinnu. Hugt verður eisini at gjaldførisætlanini. Er talan um eina endurnýggjan, verður hugt eftir roknskapinum, m.a. eftir umsetningi, eginpeningi o.ø. Er talan um endurnýggjan, verður harafturat hugt eftir, um umsøkjarin hevur hildið sínar fíggjarligu skyldur til tað almenna við at rinda skatt og arbeiðsmarknaðargjøld, eins og hugt verður eftir, um umsøkjarin hevur hildið tær reglur, sum eru galdandi fyri hetta virksemið. Reglurnar, sipað verður til, eru reglur, sum viðvíkja fíggjarligum viðurskiftum; reglur, sum á annan hátt viðvíkja virkseminum, eru fevndar av ásetingini í nr. 1.

Heilt privatu fíggjarligu viðurskifti umsøkjarans eru ikki viðkomandi í hesum sambandi, bert viðurskifti, sum hava týdning fyri vinnuliga virksemið, verða viðgjørd. Tað merkir, at onnur fallin skuld til tað almenna, t.d. kringvarpsgjald ella barnapeningur, ikki verður tikin við, tá ið metast skal um, hvørt umsøkjarin handilsliga og fíggjarliga er skikkaður at fáast við hetta virksemi.

Í triðja lagi skal dentur leggjast á støðd á og slag av virksemi, sbr. allýsingarnar í § 1, stk. 3, og hvar virksemið er staðsett. Henda áseting er viðkomandi í mun til ta yvirskipaðu ávirkanina, sum skeinkingarvirksemið hevur á samfelagið, eins og ta ávirkan, sum eitt skeinkingarstað kann hava á nærumhvørvið, t.d. um virksemið er staðsett í einum bústaðarøki.

At enda skal dentur leggjast á fráhaldslig og onnur at hesum knýtt sosial og skilhaldslig sjónarmið.

Loyvisnevndin kann frá politinum fáa til vega upplýsingar um viðurskifti, nevnd í § 11, stk. 1, nr. 5, og § 13, stk. 1, nr. 1-2. Upplýsingarnar, sum sipað verður til, eru upplýsingar um revsiverd viðurskifti og fíggjarlig viðurskifti. Við hesi áseting fær politiið heimild at lata Loyvisnevndini revsiváttan. Talan er ikki um ta vanligu privatu revsiváttanina, sum ein og hvør kann fáa frá politinum, men um ta sonevndu almennu revsiváttanina.

Ein og hvør kann biðja um at fáa avrit av síni egnu privatu revsiváttan. Ein og hvør kann eisini geva samtykki til, at onnur fáa privatu revsiváttanina, t.d. tá ið søkt verður um starv. Privata revsiváttanin er avmarkað til upplýsingar um brot á revsilógina (dómur, sekt,

frádøming og treytaður ákærufrágangur) og brot á rúsevnalóggávuna (dómur og treytaður ákærufrágangur). Útlendskar avgerðir fyri somu nevndu lógarbrot eru eisini á privatu revsiváttanini. Upplýsingarnar standa á váttanini í 2-5 ár og verða strikaðar, tá ið hetta tíðarskeið er runnið.

Almenna revsiváttanin, sum talan er um í hesum føri, hevur upplýsingar um brot á revsilógina (dómur, sekt, frádøming og treytaður ákærufrágangur) og brot á aðra lóggávu (dómur, sekt, frádøming og treytaður ákærufrágangur). Upplýsingarnar standa á váttanini í 10 ár. Afturat hesum kann politiið lata øðrum almennum myndugleikum upplýsingar úr *Det Centrale Kriminalregister*, um upplýsingarnar skulu brúkast til at varða um privat ella almenn endamál, sum greitt ganga fram um fyrilitini at halda viðurskiftini loynilig, ella um upplýsingarnar eru neyðugar fyri avgerðir, sum ein myndugleiki skal taka, t.d. í sambandi við loyvisveitan. Borgarar kunnu ikki fáa eina almennu revsiváttan, bara almennir myndugleikar kunnu fáa hesa váttan.

Ásetingin heimilar eisini skattamyndugleikunum at geva Loyvisnevndini upplýsingar um skattlig viðurskifti og onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri viðgerð Loyvisnevndarinnar, t.d. upplýsingar um falna skuld til tað almenna, eitt nú upplýsingar um arbeiðsmarknaðargjøld, sum ikki eru goldin.

Eftir stk. 3 verður landsstýrismanninum heimilað í kunngerð at áseta nærri reglur um útskeinking av rúsdrekka, undir hesum eisini reglur um gjøld fyri viðgerð av umsóknum um matstovuloyvi og skeinkiloyvi. Talan er um somu reglur, sum eru ásettar í kunngerð nr. 60/1992 um skeinkingarloyvi. Heimildin at krevja gjald fyri matstovuloyvi er nýggj; slíkt gjald hevur ikki verið kravt frammanundan. Orsøkin til, at heimild verður ásett at krevja gjald fyri matstovuloyvi er, at viðgerðin er flutt frá politinum til Loyvisnevndina.

**Til § 14**
Greinin ásetur reglur um burturfall av skeinkingarloyvi. Ásetingin er í samsvari við ta í rúsdrekkalógini frá 1992.

Skeinkiloyvið fellur burtur, tá ið loyvishavarin doyr. Eftir stk. 3 hevur eftirsitandi hjúnafelagi ella sambúgvi rætt til at taka yvir skeinkiloyvið, um samlívið hevur vart til deyða loyvishavarans, og um viðkomandi annars lýkur treytirnar í § 11, stk. 1. Undantikið er kortini aldurskravið, tí Loyvisnevndin kann loyva eftirsitandi hjúnafelaga ella sambúgva at taka yvir skeinkiloyvið hjá loyvishavara eftir stk. 3, hóast viðkomandi ikki hevur fylt 25 ár.

Afturat hesum kann Loyvisnevndin játta einum deyðabúgvi, einum hjúnafelaga í óskiftum búgvi, einum trotabúgvi ella einum verja hjá einum, ið komin er undir verjumál eftir § 5 í verjumálslógini, at halda fram við fyritøkuni hjá tí deyða, hjá trotabúnum ella hjá honum, ið komin er undir verjumál eftir § 5 í verjumálslógini, um virksemið verður at halda uppat, verður latið av hondum o.tíl. Slíkt loyvi kann bara verða givið í upp í eitt ár eftir, at loyvishavarin er deyður, at trotaúrskurðurin er gjørdur, ella eftir at viðkomandi kom undir verjumál eftir § 5 í verjumálslógini. Í heilt serligum føri ber til at víkja frá hesi freist. Hesar ásetingar eru tiknar við fyri at tryggja, at virksemið so ella so verður endað á skynsaman hátt.

Skeinkiloyvið fellur eisini burtur, tá tíðin fyri skeinkiloyvið er útgingin, uttan at skeinkiloyvið er endurnýggjað, tá loyvishavarin ikki longur brúkar skeinkiloyvið, og tá loyvishavarin ikki longu lýkur treytirnar í § 11, stk. 1 og § 12, stk. 1-2.

Loyvishavarin skal kunna Loyvisnevndina, um skeinkiloyvið ikki verður brúkt. Loyvishavari skal eisini kunna Loyvisnevndina, um hann ikki longur lýkur treytirnar í § 11, stk. 1 og § 12, stk. 1-2.

Góðkenning av leiðara fellur burtur, um viðkomandi ikki longur lýkur treytirnar í § 11, stk. 1, nr. 1-5. Leiðarin skal kunna Loyvisnevndina um slíkar broytingar.

**Til § 15**
Hava loyvishavarin ella leiðarin brotið reglurnar í hesi lóg, reglur ásettar við heimild í hesi lóg ella treytirnar í loyvinum, kann Loyvisnevndin taka loyvið aftur.

Áðrenn loyvið verður tikið aftur, skal metast um, hvørt eitt minni ínntrívandi stig kann røkka málinum (meginreglan um proportionalitet). Loyvisnevndin kann eitt nú seta treytir í sambandi við eina endurnýggjan, eins og Loyvisnevndin – er tað leiðarin, sum hevur brotið reglurnar – kann seta sum treyt, at annar leiðari verður settur at reka virksemið.

Loyvið kann eisini verða tikið aftur, um virksemið verður rikið á slíkan hátt, at tað elvir til drykkjuskap ella revsiverdar gerðir, og annaðhvørt politiið ella Loyvisnevndin frammanundan hevur ávarað loyvishavaran. Í slíkum førum er tað ein treyt fyri afturtøku, at annaðhvørt politiið ella Loyvisnevndin hava ávarað loyvishavaran frammanundan. Partur av ávaringini kann eisini vera, at ávís viðurskifti skulu fáast í rættlag.

Bæði loyvishavari og leiðari kunnu krevja, at avgerðin um at taka aftur loyvið skal verða løgd fyri dómsvaldið. Avgerðin skal tí hava upplýsingar um rættin til at leggja avgerðina fyri dómsvaldið og um kærufreist. Í seinasta lagi 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina, skal áheitan um at leggja málið fyri rættin verða latin fútanum. Málið verður lagt fyri dómsvaldið eftir reglunum í § 78, stk. 3 í revsilógini. Tá ið áheitan av hesum slag er latin fútanum, hevur hon steðgandi virknað, t.e. at virksemi kann halda fram sum áður, hóast Loyvisnevndin hevur tikið loyvið aftur. Kortini kann rætturin í úrskurði avgera, meðan málið verður viðgjørt, kann viðkomandi bara halda fram við virkseminum, um ávísar treytir verða loknar, t.d. avmarkaða upplatingartíð el. tíl. Rætturin kann eisini í úrskurði gera av, at kæra ikki er steðgandi.

**Til § 16**
Greinin ásetur upp- og afturlatingartíðirnar, sum eru galdandi fyri virksemi, ið er fevnt av lógini. Skilt verður ímillum upp- og afturlatingartíðir gerandisdagar (sunnukvøld verður í hesum høpi roknað sum gerandisdagur), í vikuskiftinum og til serlig høvi.

Útgangsstøðið er, at sunnudag til hósdag skulu matstovur og skeinkingarstøð, har almenningurin hevur atgongd, vera afturlatin millum kl. 24:00 og 05:00. Henda áseting er í samsvari við tað, sum higartil hevur verið galdandi.

Ymsar kommunur hava í fleiri umførum víst á, at kommunurnar kundu hugsað sær at havt møguleika fyri at víðka upplatingartíðirnar gerandiskvøld, serliga um summarið. Í sama viðfangi hava kommunurnar víst á, at tað átti at verið avgerðin hjá hvørji einstakari kommunu sær at gjørt av, hvussu virksemið í kommununi eigur at verða skipað. Við hesum í huga er ásett í stk. 1, 2. pkt., at kommunurnar hvør í sínum lagi kunnu gera av at leingja upplatingartíðina til kl. 02:00 gerandiskvøld (heruppií eisini sunnukvøld). Sí eisini viðmerkingarnar til stk. 4 niðanfyri.

Í stk. 2 er ásett, at matstovur og skeinkingarstøð, har almenningurin hevur atgongd, skulu lata aftur kl. 04:00 leygarmorgun og sunnumorgun. Talan er um eina staðfesting av galdandi rætti, tí kommunurnar og politiið hava fyri árum síðani gjørt av at víðka upplatingartíðirnar hesar dagar til kl. 04.00. Formliga er ásetingin kortini ongantíð broytt.

Í stk. 3 verður veitt undantak frá afturlatingartíðunum fyri gistingarhús, sum, hóast ásetingarnar í stk. 1-2, altíð kunnu borðreiða við mati og drekka fyri teimum, ið gista á gistingarhúsinum. Borðreiðast skal kortini á ein slíkan hátt, at almenningurin ikki hevur atgongd hetta tíðarskeið. Undantakið er grundað á, at borðreiðing fyri teimum, ið gista, ikki kann sammetast við borðreiðing fyri almenninginum.

Sum nakað nýtt verður ásett í stk. 4, at kommunur kunnu loyva, at vikið verður frá afturlatingartíðunum í stk. 1-2, tá ið talan er um serlig høvi. Onkuntíð er talan um heilt ítøkilig tiltøk, sum eru á staðnum, t.d. ólavsøka ella summarstevnur, men talan kann eisini vera um aðrar serligar dagar ella serlig tiltøk, sum eru grundað á lokala siðvenju. Sum dømi um slíka gamla siðvenju, ið er lokalt avmarkað, kann nevnast føroyskur dansur í Sumba triðja jólakvøld ella føstulávintstiltak føstulávintsmánakvøld á Sandi. Endamálið við hesi undantaksreglu er at geva kommununum møguleika fyri at halda gamla siðvenju í hevd, eins og endamálið er at hava skipað viðurskifti til hesi serligu tiltøk.

Ásetingin í stk. 5 er ein almenn skilhaldsregla, sum heimilar Loyvisnevndini at áseta í loyvinum, at virksemið skal steingja, áðrenn vanliga afturlatingartíðin eftir stk. 1-2 byrjar. Treytin fyri at brúka hesa reglu er, at tað er neyðugt í mun til fyrilitið fyri umhvørvi, náttarfriði og almennum skilhaldi ella av fráhaldsligum orsøkum. Talan er um eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri, og metingin skal gerast, áðrenn virksemið byrjar av fyrstan tíð. Er virksemið byrjað, og verður tað viðkomandi at viðgera spurningin um at avmarka afturlatingartíðirnar, skal viðgerðin gerast annaðhvørt eftir stk. 6, sí niðanfyri, ella í sambandi við eina endurnýggjan av loyvum til verandi virksemi.

Eftir stk. 6 kann politiið við fyriliti fyri umhvørvi, náttarfriði og almennum skilhaldi ella av fráhaldsligum orsøkum alt fyri eitt avmarka upplatingartíðirnar fyri virksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 2-6. Avmarkingin er galdandi í upp í 30 dagar. Tá ið politiið hevur avgjørt at avmarka upplatingartíðirnar skal Loyvisnevndin skjótast til ber viðgera málið og taka støðu til, hvussu upplatingartíðirnar skulu vera.

Í stk. 7 er ásett, at tað í afturlatingartíðini ikki er loyvt at borðreiða við mati og drekka ella at skeinkja rúsdrekka. Í seinasta lagi 15 minuttir fyri afturlatingartíðina skal øll søla halda uppat. Talan er um eina staðfesting av galdandi rætti, sum merkir, at hølið, starvsfólk tó undantikin, skal vera tómt, tá ið afturlatingartíðin tekur við, t.d. kl. 24:00, kl. 02:00 og kl. 04:00. Øll søla skal halda uppat 15 minuttir fyri afturlatingartíð, t.d. sostatt kl. 23:45, kl. 01:45 og kl. 03:45.

Ásetingin í stk. 8 er ein staðfesting av galdandi rætt, har tað í afturlatingartíðini kortini er loyvt at borðreiða og skeinkja fyri feløgum o.tíl., har almenningurin ikki hevur atgongd, um borðreiðingin og skeinkingin fara fram í veitsluhølum, sum ikki eru partur av vanliga hølinum, har virksemið verður rikið. Hetta er t.d. galdandi fyri fleiri gistingarhús, sum hava veitsluhøli afturat vanligu hølunum, har borðreitt verður fyri gestum og almenningi.

**Til § 17**
Ásett verður, at landsstýrismaðurin í ávísum økjum ella í øllum landinum, um tað er neyðugt vegna almennan frið og alment skilhald, fyribils kann banna, at rúsdrekka verður selt ella borðreitt á støðum við skeinkingarloyvi. Talan er um eina almenna skilhaldsreglu.

Ásetingin er í samsvari við ta í rúsdrekkalógini frá 1992.

**Til § 18**
Ásett verður, at tað á støðum, har virksemi eftir § 1, stk. 3, nr. 2-6, verður rikið, og har almenningurin hevur atgongd, er bannað at halda gang ella at sýna harðligan ella óhøviskan atburð, ið ger seg inn á almenna friðin ella hevur við sær ampa fyri tey, sum eru á staðnum ella sum búgva nær við.

Ásett verður somuleiðis, at loyvishavarin ella umboð hansara skal átala omanfyrinevnda atburð og kann um neyðugt vísa viðkomandi burtur frá staðnum ella boða politinum frá. Við heimild í hesi áseting kann politiið avgera at steingja eitt skeinkingarstað tað, sum eftir er av degnum. Treytin er kortini, at bardagi ella annað óskil er á staðnum ella hevur verið á staðnum fyrr um dagin. Politinum er eisini heimilað av trygdarávum at krevja, at skeinkingarstøð verða innrættað á ávísan hátt, um serligur vandi er fyri harðligum atburði. Er innrættingin ikki broytt innan eina hóskandi freist, sum politiið ásetur, kann politiið avgera, at staðið er afturlatið, til viðurskiftini eru fingin í rættlag.

Talan er um eina almenna skilhaldsreglu, sum er í samsvari við ta í rúsdrekkalógini frá 1992.

**Til § 19**
Til tess at tryggja, at politiið altíð kann fremja lógarásetta eftirlitið, verður ásett, at politiið, verður tað mett neyðugt, uttan rættarúrskurð, altíð hevur rætt til atgongd til høli, sum eru partur av virksemi, ið er fevnt av hesi lóg. Hetta er kortini ikki galdandi fyri kømur, sum eru leigað út til gisting.

**Til § 20**
Ásett verður, eins og frammanundan, at avgerðir Loyvisnevndarinnar ikki kunnu kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika. Avgerðir Loyvisnevndarinnar kunnu leggjast fyri rættin, sbr. § 15 og viðmerkingarnar til somu grein.

Avgerð um góðkenningar, sum ávikavist Heilsufrøðiliga starvsstovan og brunaeftirlitið taka, kunnu kærast samsvarandi teirri lóggávu, sum avgerðin er tikin eftir. Avgerðir, sum politiið tekur, vera at viðgera eftir reglunum, sum eru galdandi fyri politiið.

**Til § 21**
Ásetingin greinar, hvussu freistir, ásettar í hesi lóg, ella í reglum, givnar við heimild í hesi lóg, skulu verða roknaðar. Útgangsstøðið er, at hesar freistir byrja at ganga dagin eftir, at gerðin, sum útloysir freistina, fer fram. Hetta er galdandi fyri bæði dags-, viku-, mánaðar- og ársfreistir.

Er freistin ásett í vikum, er freistin, sbr. stk. 1, farin vikudagin eftir tann dag, freistin byrjaði at ganga. Er freistin ásett í mánaðum, er freistin, sbr. stk. 1, farin mánaðardagin eftir tann dag, freistin byrjaði at ganga. Er gerðin, sum útloysir freistina, framd seinasta dagin í einum mánaði, ella gongur freistin út ein mánaðardag, sum ikki er til, er freistin altíð farin seinasta dagin í mánaðinum, líka mikið hvussu langur mánaðurin er. Er freistin ásett í árum, er

freistin, sbr. stk. 1, farin ársdagin eftir tann dag, freistin byrjaði at ganga. Um freistin gongur út í einum vikuskifti, á einum halgidegi, grundlógardag, jólaaftansdag ella nýggjársaftansdag, verður freistin longd til fyrsta gerandisdag eftir hetta.

Bæði Loyvisnevndin og politiið hava heimild at áseta freistir eftir hesi lóg, og umráðandi er tí, at tað er púra greitt, hvussu hesar freistir verða roknaðar.

**Til § 22**
Ásetingin er í stóran mun tann sama sum í rúsdrekkalógini frá 1992. Ásett verður, at er ikki hægri revsing uppiborin eftir lóggávuni annars, verður við sekt ella við fongsli í upp í eitt ár revsaður tann, ið brýtur ásetingarnar í § 2, stk. 6-8, § 3, § 4, § 5, § 6, stk. 4, § 12, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2, § 14, stk. 2, 2. pkt., og § 16, stk. 6. Medvirkni verður revsað á sama hátt.

Sambært stk. 2 verður revsaður við sekt ella fongsli í upp í 1 ár tann, sum setur til viks treytir í skeinkiloyvinum, sbr. § 10, stk. 1, ella treytir í øðrum loyvum ella góðkenningum, sbr. § 2, ella ikki lýðir boð ella forboð, givin eftir lógini ella eftir reglum, givnar við heimild í lógini.

Í stk. 3 verður ásett, at brot á reglurnar ella treytir, givnar eftir reglunum, verður revsað við sekt ella fongsli í upp í eitt ár.

Brot á treytir í skeinkiloyvinum , brot á treytir í øðrum loyvum ella góðkenningum verða revsað á sama hátt sum brot á ásetingar í lógini. Hetta er grundað á, at hesar treytir eru eins týðandi sum lógarásetingarnar sjálvar, og umráðandi er at gera greitt, at treytirnar skulu haldast.

Eftir stk. 4 kunnu feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir eftir reglunum í 5. kapitli í revsilógini.

Í stk. 5 verður ásett, at tá ið sekt verður ásett sbrt. stk. 1-2, skal fyrilit havast fyri, um brotið er framt við fíggjarligum vinningi ella sparing fyri eyga, uttan mun til um fíggjarligi vinningurin er fingin ella bert var tilætlaður, sbr. revsilógarinnar § 51, stk. 3, og § 80.

Í stk. 6 verður ásett, tann, ið stendur fyri virksemi eftir hesi lóg, kann verða revsaður við sekt fyri brot á ásetingarnar í § 4, stk. 1-2 og § 16, stk. 6, 2. pkt., uttan mun til, um brotið er framt av starvsfólki og uttan mun til, um brotið er tilætlað ella framt av grovum ósketni.

Hóast eitt brot sambært lógini er revsivert, kann revsingin, við støði í ítøkiligu umstøðunum í málinum og eftir eina ítøkiliga meting, fyri sambærilig brot vera ymisk.

Brot kunnu verða revsað við sekt ella við bæði sekt og fongsulsrevsing. Í flestu førum er revsing við sekt ein hóskandi revsing. Revsing fyri brot á lógina verður ásett sambært reglunum í 10. kapitli í revsilógini, har tað er tilskilað, at tá ið revsingin skal ásetast, skal havast fyrilit fyri, hvussu álvarsligt brotið er.

Eisini skal havast fyrilit fyri upplýsingum um lógbrótaran, eitt nú um persónlig og sosial viðurskifti, um viðurskifti hansara fyri og eftir gerðina og um orsøkina til, at brotið er framt. Harafturat skal, tá ið revsing verður ásett, havast fyrilit fyri, um brotið er framt við fíggjarligum vinningi ella sparing fyri eyga, uttan mun til um fíggjarligi vinningurin er fingin ella bert var tilætlaður, sbr. revsilógarinnar § 51, stk. 3, og § 80.

Revsiásetingin er býtt sundur í tríggjar partar; orsøkin til hetta sundurbýtið er m.a., at politiið fyri smærri lógarbrot skal hava møguleika at avgreiða málið við sektaruppskoti. Tá ið metast skal um, hvørt talan er um grovar ella serliga herðandi umstøður, skal dentur leggjast á tær avleiðingar, sum lógarbrotið hevur havt við sær, og um lógarbrotið hevur staðið við í longri tíð ella er endurtikið. Dentur eigur eisini at leggjast á, um lógarbrotið er framt tilvitað.

Mál, sum verða viðgjørd eftir hesum reglum, ella eftir reglum, sum eru ásettar í kunngerð við heimild í hesum reglum, verða viðgjørd sum politimál. Tey í rættargangslógini nevndu tiltøk í kap. 72 um at leggja hald á og kap. 73 um rannsakan kunnu nýtast í sama mun sum í statsadvokatmálum.

**Til § 23**
Reglur um gildiskomu. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fara úr gildi samsvarandi ásetingar í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka, eins og revsiásetingin í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka verður broytt. Somuleiðis fer úr gildi § 5 í halgidagslógini.

Ásett verður, at kunngerðir, givnar við heimild í § 8, stk. 2, § 9, stk. 4, og § 13 í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka verða verandi í gildi, til tær verða settar úr gildi.

Skeinkiloyvi, givin við heimild í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka, verða verandi í gildi, til tey fara úr gildi sambært dagfestingini á loyvinum, ella tá ið tey av øðrum orsøkum fara úr gildi. Endurnýggjan fer fram eftir reglunum í hesi lóg.